Brúkaraumboðið



# Ársfrágreiðing

# 2024



# Innihaldsyvirlit


**Embætið hjá Brúkaraumboðnum** 4

**Virksemið í 2024** 6

**Kunningarvirksemið hjá Brúkaraumboðnum** 7

**Spurningar umvegis telefon** 9

**Kapittul 1** 12

Góður marknaðarføringssiður 12

**Ávís útvald mál í 2024** 14

**Kapittul 2** 15

Villleiðandi marknaðarføring 15

**Kapittul 3** 18

Óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar 18

**Kapittul 4** 21

Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung 21

**Kapittul 5** 26

Prísmarknaðarføring 26

**Kapittul 6** 34

Vinnulig eyðkenni 34

**Kapittul 7** 37

Forhandarmeting 37

**Kapittul 8** 40

Gjaldslóg 40

**Vegleiðingar og kunning** 46

Elektronisk gávukort hevur tú rætt til at fáa útgoldið 47

Ómaksgjøld – avgreiðslugjald og kortgjald 50

Greiðari treytir fyri bilaútleigan 53

Black Friday – gott at vita áðrenn farið verður á stóra útsøludagin 54
Norðurlendsku brúkaraumboðini økja samstarvið fyri at styrkja brúkaraverndina 56
Jobmatch 2024 58

# Embætið hjá Brúkaraumboðnum

Brúkaraumboðið varð sett á stovn 1. januar 2009, tá lóg um marknaðarføring varð sett í gildi.

Sambært marknaðarføringslógini setir landsstýrismaðurin Brúkaraumboðið fyri eitt 5-ára tíðarskeið. Síðani 1. november 2022 hevur Rannvá Sólheim røkt starvið, sum Brúkaraumboð.

Afturat stjóranum eru tvey løgfrøðilesandi í starvi á Brúkaraumboðnum. Talan er um parttíðarstørv, sum verða røkt við síðuna av lesnaðinum.

Brúkaraumboðið er stovnur undir Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og hevur eftirlit við, at marknaðarføringslógin og partar av gjaldslógini verða hildnar.

Brúkaraumboðið er sjálvstøðugur myndugleiki og stovnur. Avgerðir Brúkaraumboðsins kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika.

Brúkaraumboðið skal av sínum eintingum, ella eftir áheitan við samráðingum, royna at ávirka vinnurekandi at virka eftir meginregluni fyri góðan marknaðarføringssið og yvirhøvur at halda lóggávuna á økinum.

Brúkaraumboðið raðfestir støðugt sítt arbeiði eftir menning og rák í samfelagnum og út frá teimum fráboðanum, ið Brúkaraumboðið fær. Á hvørjum ári verður avgjørt, hvørji øki skulu raðfestast at arbeiða við í árinum.



*Rannvá Sólheim, Brúkaraumboð*

## Raðfestingar í 2024

Eitt týðandi arbeiði hjá Brúkaraumboðnum er, at kunna vinnurekandi og borgarar um marknaðarføringslógina og gjaldslógina. Hetta verður m.a. gjørt umvegis miðlar og við at hava framløgur og fundir við vinnurekandi. Í hesum sambandi hava vit eisini arbeitt nógv við okkara egnu heimasíðu, soleiðis at tað verður léttari hjá bæði borgarum og vinnurekandi, at kunna seg um reglurnar. Allar vegleiðingar eru endurskoðaðar og dagførdar, og verður hetta arbeiðið væntandi skjótt liðugt og almannakunngjørt á heimasíðuni www.bruk.fo

Brúkaraumboðið hevur eisini gjørt tvær nýggjar vegleiðingar í 2024. Onnur er um elektronisk gávukort og hin er um ómaksgjøld. Eisini sendi Brúkaraumboðið

skriv út til allar bilaleigufyritøkur um greiðari treytir fyri bilaútleigan.

Flestu gávukort í dag eru elektronisk og nógv fólk vita ikki, at tað fylgja nøkur serlig rættindi við hesum gávukortum. Millum annað kunnu elektronisk gávukort útgjaldast, bæði í gildistíðini og upp til 1 ár eftir at gávukortið er útgingið.

Brúkaraumboðið hevur skrásett heili 229 mál í 2024 og er hetta 35 mál fleiri enn í 2023. Ein stórur partur av málunum vóru fyrispurningar og prei. Tað er gjørligt umvegis heimasíðuna at geva dulnevnt prei, og verður hetta eisini nógv brúkt. Brúkaraumboðið ger altíð eina ítøkiliga meting av øllum tí, ið kemur inn, og fleiri prei eru tikin upp sum mál.

Hóast talið av málum er hækkað, er talið av klagum minkað nakað. Hinvegin er talið av forhandarmetingum økt. Ein møguleiki í marknaðarføringslógini er, at vinnurekandi kunnu heita á Brúkaraumboðið um at gera eina meting av, um ætlað marknaðarføringstiltøk kunnu metast at vera lóglig ella ikki. Hetta hava fleiri vinnurekandi gjørt brúk av.

Á heysti 2024 gjørdi Brúkaraumboðið stakroyndir av umleið 50 ymiskum Ja takk tilboðum hjá 11 handlum kring landið. Kannað varð, um fyrr- og nú prísir vóru rætt upplýstir. Úrslitið var misjavnt. Í fleiri førum vísti tað seg nevniliga, at handlar marknaðarførdu eina vøru sum “Ja takk tilboð”, og vístu á ein undanprís sum ikki var veruligur, tí handilin als ikki hevði havt vøruna til sølu frammanundan. Eisini vóru trupulleikar við, at handlar upplýstu ein ov høgan undanprís. Hetta er villleiðandi fyri kundan, sum fær eina fatan av, at sparingin er størri, og tilboðið er betri, enn tað í veruleikanum er. Fleiri handlar fingu átalu frá Brúkaraumboðnum.

## Brúkaravernd

Brúkaraumboðið hevur í fleiri ár víst á tørvin á eini brúkaraklagunevnd.

Við eini brúkaraklagunevnd, høvdu rættindini hjá brúkaranum batnað munandi.

Í 2024 hevði Brúkaraumboðið fund við táverandi landsstýrismann í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal, um málið. Eftir fundin sendi Brúkaraumboðið eitt upprit til landsstýrismannin um at seta á stovn brúkaraklagunevnd í Føroyum.

Landsstýrismaðurin hevur víst áhuga fyri málinum, hóast eingin peningur bleiv settur av á fíggjarlógini fyri 2025.

Tað eru ymiskir mátar ein brúkaraklagunevnd kann skipast uppá. Millum annað skal støða takast til, um talan skal vera um bæði mekling og klagunevnd ella bert tað eina. Brúkaraumboðið fer at arbeiða víðari við málinum í 2025.

Tórshavn, tann 26. mars 2025



Brúkaraumboðið

Rannvá Sólheim

# Virksemið í 2024

Í 2024 vórðu skrásett 229 mál.

Av hesum vóru 50 kærur/eftirlitsmál, 153 fyrispurningar/fráboðanir/forhandarmetingar og 26 mál av øðrum slag.



# Kunningarvirksemið hjá Brúkaraumboðnum

Brúkaraumboðið umsitur og hevur eftirlit við marknaðarføringslógini og pørtum av gjaldslógini, og at vinnurekandi og stovnar halda reglurnar samsvarandi hesum lógum. Ein partur av eftirlitinum er fyribyrgjandi og upplýsandi. Brúkaraumboðið er tí javnan á vitjan hjá bæði vinnurekandi og øðrum, har Brúkaraumboðið greiðir frá og kunnar um reglurnar og um virksemið.

Brúkarumboðið metir, at slíkt kunningarvirksemið hevur stóran týdning. Fyrst og fremst tí tað fremur arbeiðið hjá Brúkaraumboðnum, at ávirka vinnurekandi og stovnar yvirhøvur at halda lógina. Men tað gevur eisini høvið at umrøða ivamál. Brúkaraumboðið fær nógvar spurningar til hesi tiltøk - eisini aftaná, umvegis teldupost.

## Brúkaraumboðið vitjar vinnuna

Brúkaraumboðið hevur havt framløgu fyri vinnurekandi, har vit greiddu frá um arbeiðið, og um ávísar reglur í marknaðarføringslógini og gjaldslógini. Eisini nýttu tey vinnurekandi høvi at seta spurningar um bæði mál, avgerðir og virksemið hjá Brúkarumboðnum.



Brúkaraumboðið er ein sjálvstøðugur stovnur, men leigar seg inn í hølir hjá Vinnustovninum. Á Vinnustovninum starvast yvir 40 fólk á ymsum deildum. Brúkaraumboðið hevur havt framløgu fyri starvsfólkunum á Vinnustovninum um marknaðarføringslógina og gjaldslógina. Tiltakið var væl vitja, og tey kláraðu seg væl í spurnarkappingini, ið var aftaná.

## Brúkaraumboðið luttók á ráðstevnu

Brúkaraumboðið luttók á Fólkaheilsu- & matumhvørvisráðstevnu, ið var hildin í Kongshøll í septembur 2024. Talan var um eitt sera væleydnað tiltak við fjølbroyttari skrá. Seinasta punkt á skránni var kjak við orðstýrara, har breitt eitt umboðandi panel hevði orðaskifti. Brúkaraumboðið luttók í orðaskiftinum.



## Brúkaraumboðið á Glasi

Brúkaraumboðið er á hvørjum árið á Glasi, og hevur framløgu fyri næmingum, sum hava vinnulívsrætt. Framløgan snýr seg um lóggávuna, ið Brúkarumboðið umsitur og hevur eftirlit við, um vegleiðingar og um mál, ið Brúkaraumboðið hevur viðgjørt.

Vanliga verður endað við spurningum og eini Kahoot-kapping. Næmingarnir eru sera hugagóðir, fylgja væl við og seta nógvar spurningar.



*Kahoot kapping um marknaðarføringslógina*

Brúkarumboðið vísti runt á deildunum hjá Vinnustovninum, og eisini fingu tey vitjandi okkurt lætt at eta, áðrenn farið var víðari í skránni. Umboð fyri Vinnustovnin nýttu eisini høvi at greiða stutt frá um teirra økið. Tiltakið var sera væleydnað.



*Føroysk løgfrøðilesandi vitja*

## Føroysk løgfrøðilesandi vitja

LLF – felagið fyri løgfrøðilesandi í Føroyum setti seg í samband við Brúkaraumboðið, og spurdi um tað var møguligt at koma á vitjan. Tað verður ikki undirvíst í marknaðarføringslógini á løgfrøði- útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Tí mettu nevndarlimirnir í LLF, at tað var eitt gott høvi at fáa kunning um lógina og virkisøkið hjá Brúkaraumboðnum. Hetta vildi Brúkaraumboðið fegin.

# Spurningar umvegis telefon

Í 2023 fór Brúkaraumboðið undir at skráseta spurningar, sum komu umvegis telefon, og vóru 147 spurningar umvegis telefon skrásettir.

Í 2024 vórðu skrásettir 124 spurningar umvegis telefon. Spurningarnir hava snúð seg um ymisk viðurskifti, og hevur Brúkaraumboðið tikið onkrar av teimum upp sum mál. 57 av innkomnu spurningunum í 2024, hava m.a. verið um ábrek við vørum, um reklamatión og um umvælingar.

Brúkaraumboðið hevur ikki heimild at fara inn í hesi mál, men hevur vegleitt sambært keypilógini. Niðanfyri verða umrøtt nøkur av evnunum, sum Brúkaraumboðið hevur vegleitt um, umvegis telefon í 2024.

## Iðranarrættur – og afturberingarrættur

Keyp er bindandi avtala, og keyparin kann í grundini ikki iðra seg um keypið. Hóast fleiri handlar geva keyparum rætt til at bera aftur ella býta um, er tað ikki ein rættur keyparin hevur sambært lóg. Seljarin ger sjálvur av, um hann gevur iðranarrætt, og hvørjar reglur skulu galda í sambandi við iðranarrættin. Tað, ið galdandi er fyri iðranarrætt, skal verða avtalað, tá ið keypt varð.

## Er vøran ikki í lagi?

Vøran nýtist ikki at vera brotin fyri at hava eitt ábrek. Sum tað sæst niðanfyri, kann ábrek við tí keypta vera nógv ymiskt. Orðið "ábrek" ella "mangul" sum tað ofta verður nevnt, skal skiljast breitt. Sambært keypilógini er ikki altíð talan um ábrek, hóast okkurt er galið við vøruni. Talan er bert um ábrek, um hetta ella orsøkin til hetta, er til staðar, tá keyparin fær vøruna. Ábrekið kann væl hava verið til staðar, tá keypið fór fram, hóast hetta ikki vísir seg fyrr enn seinni.

Sum dømi um ábrek (manglar) sambært keypilógini kunnu nevnast:

- Nýggja telefonin sløknar, uttan at tú tilvitað hevur sløkt hana ella at hon manglar at løðast.
- Vøran samsvarar ikki við heitið, hon er seld undir. Sofan er seld sum leðursofa, men tað vísir seg, at tað bara eru púturnar, sum eru leður, restin er leðurlíki.
- Vøran hóskar seg ikki til endamálið, hóast seljarin hevur váttað, at hon er hóskandi. Seljarin, ið veit hvat slag av teldu tú eigur, viðmælir ein ávísan prentara, ið ikki er sambæriligur við tína gomlu teldu.

• Vøran hevur ikki ta haldgóðsku, ið tú eigur at kunna krevja. Tín nýggja vaskimaskina brotnar aftaná 10 mánaðir, orsakað av einum feili í motorinum.

• Eitt sølulið longri frammi í ketuni, t.d. innflytari ella framleiðari, hevur í lýsingum ella á innpakking givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar um vøruna, t.d. at bilurin hevur sóltak.

## Umvælingar

Sambært keypilógini er ein tvey ára freist at fráboða seljara, at okkurt er galið við vøruni. Er freistin runnin, skal keyparin sjálvur rinda fyri umvælingina. Hetta er eisini galdandi, hóast freistin ikki er runnin, men ábrekið ikki er fevnt av keypilógini, t.d. um keyparin sjálvur kann ábyrgjast fyri ábrekið.

Er støðan tann, at umvælingin er illa gjørd, tekur sera langa tíð ella hevur ført við sær nýggjar skaðar, og vøran ikki riggar sum hon skal aftaná umvælingina, ber til at klaga til umvælaran. Í ávísum føri, kann umvælarin fáa møguleika at gera eina roynd afturat at rætta ábrekið, og tí ber ikki altíð til, at krevja peningin aftur beinanvegin. Er ábrekið afturvendandi og umvælarin ikki kann umvæla ábrekið, er útgangsstøðið, at keyparin kann krevja at fáa peningin fyri vøruna aftur. Er talan tó um eitt ábrek, ið bert er av og á, kann tað vera trupult at staðfesta ábrekið, og tí kann gerast neyðugt við fleiri royndum at umvæla

## Umvælingar, tú skalt gjalda fyri

Útgangsstøðið er, at ein avtala er bindandi millum partarnar. Hetta merkir, at umvælarin ikki kann krevja eitt hægri gjald, um hann er farin skeivur av prísinum, ella um arbeiðið lekur longri tíð enn væntað. Er talan um trupulleikar, ið umvælarin ikki hevði møguleika at síggja frammanundan, kann borgarin tó ikki krevja, at umvælingin verður gjørd fyri tann avtalaða prísin. Verður umvælarin varugur við, at umvælingin ikki kann gerast fyri tann avtalaða prísin, skal hann steðga umvælingini og seta seg í samband við borgaran, so hann kann taka støðu til, um umvælingin skal gerast ella ikki.

## Umvælingar, ið taka langa tíð

Hóast tað er avtalað, at umvælingin skal verða liðug ein ávísan dag, má borgarin ofta góðtaka, at arbeiðið verður nakað seinkað. Hetta er serliga galdandi, um tað er torført at fáa eykalutir, um vøran ella ábrekið er sera fløkt ella um talan er um eitt ábrek, ið er sjáldsamt og tí torført at finna útav.

## Fyrispurningar um gávukort

Brúkaraumboðið fekk fleiri fyrispurningar um gávukort, og verða nakrir av spurningunum umrøddir her.

### Gávukort galdandi í 3 mánaðar

Ein borgari vendi sær til Brúkaraumboðið, tí hann hevði fingið eitt gávukort til eina matstovu, har hetta einans var galdandi í 3 mánaðar. Borgarin hevði ikki havt stundir at brúkt gávukortið áðrenn freistin var runnin, og vendi sær tí til Brúkaraumboðið.

Brúkaraumboðið vísti á, at útgangsstøðið er, at ein freist styttri enn 1 ár er í stríð við § 1 í marknaðarføringslógini um góðan marknaðarføringssið.

## Fyrispurningur um gildistíðina á gávukortum

Brúkaraumboðið hevur eisini fingið fyrispurningar frá fyritøkum um gildistíðina á gávukortum, og í hvønn mun fyritøkurnar sjálvar kunnu áseta hvussu long gildistíðin skal vera.

Brúkaraumboðið vísti á, at sambært fyrningarlógini fyrnast gávukort sum útgangsstøðið eftir 5 árum, um onnur avtala ikki er gjørd. Um onnur freist er avtalað, so skal henda ikki vera órímiliga stutt. Sum víst á, metir Brúkaraumboðið, at ein freist styttri enn 1 ár er í stríð við góðan marknaðarføringssið.

Tað kunnu tó verða umstøður, har ein freist á minni enn 1 ár verður góðtikin, og er hetta um talan er um eitt ávíst tiltak; um gávukortið er bundið av árstíðini; ella talan er um eitt serliga gott tilboð, t.d. á Black Friday.

Er gildistíðin styttri enn 5 ár, skal hetta týðiliga upplýsast á gávukortinum.

Reglurnar fyri tilgóðarseðlar eru tær somu sum fyri gávukort.

Er talan um elektronisk gávukort ella elektroniskar tilgóðarseðlar, eru aðrar reglur galdandi, har møguleiki er fyri at fáa virðið útgoldið.

Tú kanst lesa meira um elektronisk gávukort í kapittul 8 í hesi ársfrágreiðing.

Eisini hevur Brúkaraumboðið gjørt eina nýggja vegleiðing um útgjalding av elektroniskum gávukortum, sí vegleiðingar til seinast í hesi ársfrágreiðing.

## Burturmist gávukort

Ein borgari spurdi Brúkaraumboðið, hvørjar reglur eru galdandi, um eitt gávukort ella tilgóðarseðil verður burtur. Viðkomandi hevði mist sín tilgóðarseðil burtur, og vildi vita, hvørji rættindi hann hevði.

Brúkaraumboðið greiddi frá, at um talan er um eitt vanligt pappírs gávukort ella tilgóðarseðil, so er talan um eitt sokallað handhavaraskjal. Í mun til tann vinnurekandi merkir tað, at tann persónur, sum hevur gávukortið ella tilgóðarseðilin um hendi, eisini er tann, sum kann brúka tað.

Útgangsstøðið er sostatt, at um gávukort ella tilgóðarseðil eru horvin, so verður hetta ikki endurgoldið.

Les meira um elektronisk gávukort undir vegleiðingar og kunning.



# Kapittul 1

## Góður marknaðarføringssiður

Brúkaraumboðið

Brúkaraumboðið varðar av og hevur eftirlit við, at lóg um marknaðarføring verður hildin. Marknaðarføringslógin skapar karmar og spælireglur fyri marknaðarføring í Føroyum, sum eru so mikið víðar, at tey sum marknaðarføra vørur og tænastur, skulu kenna, at til ber at vera skapandi og at menna nýggjar marknaðarføringshættir.

Marknaðarføringslógin skal eisini virka fyri at skapa góðar normar á marknaðinum, og áleggur teimum, ið eru fevnd av lógini, at sýna góðan marknaðarføringssið við atliti til brúkaran, vinnurekandi og almenn samfelagsáhugamál. Hetta er ein heildartreyt, ið er ásett í § 1 í lóg um marknaðarføring.

Ætlanin við heildartreytini um at sýna góðan marknaðarføringssið er, at ásetingin kann nýtast ímóti øllum sløgum av órímiligum sølu og lýsingatiltøkum, ímóti eftirgerð og aðrari misnýtslu av avriki hjá vinnurekandi, ímóti órímiligum avtalutreytum, og til tess at verja persónligt sjálvræði umframt heimafrið.

Útvalt er eitt mál um góðan marknaðarføringssið hjá Brúkaraumboðnum frá 2024, og verður hetta umrøtt niðanfyri.

## Fyritøkur bidnar um at upplýsa kortgjald og rætta viðskiftatreytir

Brúkaraumboðið metir, at tað er góður marknaðarføringssiður at vinnurekandi upplýsa rættar viðskiftatreytir og fullfíggjaðan prís.

Í tí sambandi setti Brúkaraumboðið seg í samband við tvær fyritøkur, ið ikki høvdu upplýst á heimasíðuni og í lýsing, at kortgjald kemur afturat prísinum á atgongumerkinum. Av tí at kortgjaldið er tengt at veitaranum av kortinum, er trupult at áseta upphæddina fyri kortgjaldið. Brúkaraumboðið vísti tó á, at sum minstamark skal upplýsast, at kortgjald verður lagt afturat prísinum, og at hetta skal standa á sama stað, har sum prísurin er upplýstur.

Tá talan var um viðskiftatreytir, vístu báðar fyritøkurnar til at brúkarin hevði iðranarrætt eftir Forbrugeravtaleloven. Hetta er donsk lóggáva, og ásetingarnar vóru hvørki rættar, ella eru í gildi í Føroyum. Í Føroyum hevur brúkarin ikki lógarkravdan iðranarrætt til keypta vøru. Fyritøkurnar vóru tí biðnar um at fáa hetta í rættlag.

Eisini bað Brúkaraumboðið fyritøkurnar upplýsa, hvat er galdandi, um eitt tiltak verður útsett ella avlýst. Útgangsstøðið er tá, at til ber at fáa atgongumerkið endurrindað. Vanliga verða kortgjald og avgreiðslugjald ikki endurrindað.

Báðar fyritøkurnar rættaðu upplýsingarnar beinanvegin, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.










**Ávís útvald mál í 2024**

# Kapittul 2

## Villleiðandi marknaðarføring

Sambært § 3 í lóg um marknaðarføring er ikki loyvt at nýta villleiðandi og óhóskandi marknaðarføring. Ásetingin er í høvuðsheitum ætlað at verða brúkt um tað, sum vinnurekandi siga um teirra egnu vørur og tænastur, herundir um prís og eginleikar, í førum har hetta kann geva móttakaranum eina skeiva fatan av vørunum ella tænastunum. Ætlanin er at tryggja, at skeivar, villleiðandi, niðrandi ella órímiliga ófullfíggjaðar upplýsingar ikki verða nýttar í marknaðarføring.

Endamálið er at verja onnur vinnurekandi og brúkarar ímóti upplýsingum og framferðarhættum, sum eru óhóskandi. Ásetingin er avmarkað til at umfata gerðir, sum kunnu ávirka útboð og eftirspurning. Harumframt er krav um, at tað skal kunna skjalprógvast, at upplýsingar, sum verða latnar um verulig viðurskifti, eru rættar.

Brúkaraumboðið hevur í 2024 viðgjørt sera nógv mál um villleiðandi marknaðarføring, har nøkur av hesum verða umrødd niðanfyri.

## Sølutreyt um ókeypis gjøgnumkoyring í øllum tunlum mett sum villleiðandi

Brúkaraumboðið fekk eina klagu frá einum borgara um marknaðarføringina hjá eini fyritøku. Klagan snúði seg um marknaðarføring av tilboði um óavmarkaða koyring í tunlunum í Føroyum, sum fyritøkan bjóðaði í sambandi við, at kundin leigaði bil frá fyritøkuni. Tilboðið var marknaðarført sum "Unlimited Tunnel Pass". Av tí, at einki annað var frámerkt ella upplýst í lýsta tilboðnum, helt klagarin, at tilboðið mátti fevna um óavmarkaða koyring í øllum tunlunum í Føroyum.

Tá ferðin var av, fekk borgarin eina rokning fyri koyring í tunlunum til Eysturoynna og Sandoynna. Harumframt greiddi borgarin frá, at hann hevði leigað bústað tætt við Eysturoyrartunnilin, og var tilboðið um "Unlimitied Tunnel Pass" avgerandi fyri, at hann valdi at leiga bil frá júst hesi fyritøku.

Borgarin setti seg tí í samband við fyritøkuna, og greiddi frá støðuni. Fyritøkan upplýsti, at "Unlimited Tunnel

Pass” ikki var galdandi fyri Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin.

Eftir samskifti millum partarnar viðurkendi fyritøkan, at tað kann ørkymla at tey hava brúkt orðingina “Unlimited”, og at orðingin “Unlimited” tí varð strikað.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, og vísti á, at fyritøkan hevur ábyrgdina av at tryggja, at marknaðarførda tilboðið er rætt lýst. Eru ávísar treytir ella avmarkingar til tilboðið, eiga hesar greitt at vera upplýstar, soleiðis at kundin ómaksleyst kann gera sær eina meting av tilboðnum.

Brúkaraumboðið metti ikki, at tað framgekk greitt av tilboðnum, at talan var um serligar avmarkingar. Harafturat vísti Brúkaraumboðið á, at sambært § 3 í marknaðarføringslógini, mugu vinnurekandi ikki brúka skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella leggja burtur týðandi upplýsingar í marknaðarføring av sínum vørum ella tænastum.

Klagarin fekk ikki upplýst áðrenn keypið, at tilboðið einans var galdandi fyri tveir av teimum fýra undirsjóvartunlunum í Føroyum. Fyritøkan brúkti orðingina “unlimited” í lýsta tilboðnum. Tá einki frámerki var, sum greitt vísti, at “unlimited” bert var galdandi fyri ávísar tunlar, so má tað merkja, at tilboðið er galdandi uttan avmarking og fyri allar undirsjóvartunlarnar.

Brúkaraumboðið metti tí, at marknaðarføringin av tilboðnum “Unlimited Tunnel Pass” hjá fyritøkuni var villleiðandi og ikki í tráð við § 3, stk. 1 í marknaðarføringslógini.

Fyritøkan fekk átalu fyri hesi brot.

## “Heimsins besti kompressari” og “Besta fundarstað”

Brúkaraumboðið viðgjørdi tvey mál, har tvær ymiskar fyritøkur marknaðarførdu seg til at hava annaðhvørt “Besta fundarstað”, og “Heimsins besta kompressara”. Brúkaraumboðið kom til tvær ymiskar niðurstøður í málunum.

Sambært § 3, stk. 3 í marknaðarføringslógini skulu upplýsingar um verulig viðurskifti kunna skjalprógvast. Brúkaraumboðið kann tí krevja, at útsagnir sum t.d. “Heimsins besti kompressari” verða skjalprógvaðar. Talan er um upplýsingar, sum í stóran mun kunnu mátast, og megnar tann vinnurekandi ikki at skjalprógva, at kompressarin í hesum føri veruliga er heimsins besti, so er talan um villleiðandi marknaðarføring sambært § 3, stk. 2 í marknaðarføringslógini.

Í hesum málinum vísti Brúkaraumboðið á, at tað ber til at brúka aðrar útsagnir í staðin, t.d. “møguliga heimsins besti kompressari” ella “vit halda heimsins besti”.

Tó er søluskvaldur eitt undantak til regluna í § 3, stk. 3 í marknaðarføringslógini. Hetta eru útsagnir, sum miðalbrúkarin gott kann gjøgnumskoða. Hetta eru útsagnir sum til dømis “óslítandi skógvar” ella “byens bedste boller”.

Brúkaraumboðið metti, at útsøgnin "Besta fundarstað", ikki var í stríð við marknaðarføringslógina, tí at henda útsøgn kann hvørki prógvast ella mótprógvast. Talan er um eina subjektiva meting hjá hvørjum einstøkum, og tí verður hetta bólkað undir søluskvaldur.

## Skeiv prísskelting í tveimum handlum

Brúkaraumboðið fekk fráboðanir frá tveimum borgarum um skeiva prísskelting í tveimum ymiskum handlum.

Í tí fyrra førinum var talan um ein matvøruhandil, sum lýsti við blæum frá Rema 1000 til ein fastan lágan prís. Tá borgarin kom í handilin, so kundi hann ikki fáa blæurnar til henda prísin, tí talan var um ein feil.

Brúkaraumboðið vísti á í hesum føri, at um upplýsti lágprísurin frá tilboðsblaðnum ikki er rættur, kann talan vera um villleiðandi marknaðarføring sambært § 3 í marknaðarføringslógini.

Brúkaraumboðið vísti sostatt á, at tá prísur verður marknaðarførdur, hevur kundin rætt til at fáa vøruna fyri henda prís.

Handilin rættaði hetta mistak beinanvegin og málið endaði við, at borgarin fekk munin endurrindaðan, sum hann hevði goldið ov nógv. Brúkaraumboðið gjørdi síðan ikki meira við málið.

Í hinum førinum var talan um ein handil, sum hevði vørur til sølu á einum stativi, har lýst varð við "Ferðastøddir, 3 fyri 2, fá tí bíligastu ókeypis". Tá kundin skuldi gjalda fyri vørurnar varð sagt, at avsláttin einans var galdandi fyri vørurnar á tveimum teimum ovastu hillunum. Einki frámerki var á stativinum um hesa avmarking.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, og vísti á § 3 í marknaðarføringslógini, at ikki er loyvt at leggja burturúr týðandi upplýsingar, um tær kunnu nýtast til týðiliga at avlaga búskaparligu atferðina hjá brúkarunum ella øðrum vinnurekandi.

Fyritøkan rættaði hetta beinanvegin, og Brúkaraumboðið gjørdi tískil ikki meira við málið.

# Kapittul 3

## Óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar

§ 6 í marknaðarføringslógini verður ofta rópt “Spammforboðið”.

Sambært § 6 í marknaðarføringslógini, er møguleikin hjá einum vinnurekandi at senda út lýsingar umvegis elektroniskt samskifti avmarkaður. Nevnast kann, at tað í fyrstu syftu er forboðið at senda lýsingar út við t.d. telduposti, sms og telefon. Hinvegin er tað sum útgangsstøði lógligt at senda lýsingar út við vanligum brævi, tilskrivaðari lýsing og aðrari beinleiðis marknaðarføring. Lýsingar, ið ikki venda sær beinleiðis til húsarhald, men eru borin út uttan tilknýti til bústaðin, og lýsingar á netinum, eru ikki umfataðar av greinini.

Greinin fevnir um lýsingar í breiðum týdningi – t.v.s. bæði lýsingar av ítøkiligum vørum ella veitingum, men eisini áheitanir við tí endamáli at gera fólk varug við navnið hjá tí vinnurekandi.

Sambært § 6, stk. 1, er tað í vinnuvirksemi ikki loyvt at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms, mms ella líknandi, sjálvvirkandi uppkallingarskipan, telefaksi ella telefon. Hetta er ikki galdandi, um móttakarin frammanundan hevur biðið vinnurekandi um at venda sær til sín á tílíkan hátt. Forboðið er galdandi **óansæð um móttakarin er brúkari, vinnurekandi ella almennur stovnur.**

§ 6, stk. 2, er **eitt undantak til ásetingina í stk. 1**. Ein vinnurekandi kann – umvegis teldupost – senda lýsingar út um sínar egnu vørur og veitingar, ið samsvara við tær vørur og veitingar, sum kundin áður hevur keypt frá tí vinnurekandi. Hetta er treytað av, at kundin, í samband við keyp frá tí vinnurekandi, hevur upplýst sín teldupostbústað. Tó skal kundin, tá hann letur sín teldupostbústað, hava møguleika at biðja seg undan at fáa lýsingar. Noktar kundin ikki at móttaka lýsingar, tá hann letur sín teldupostbústað, skal hann fyri hvørja eftirfylgjandi áheitan hava møguleika at biðja seg undan fleiri áheitanum.

## Orkað meldað til løgregluna

Brúkaraumboðið móttók tríggjar fráboðanir um, at Sp/f 16, undir navninum Orkað, hevði ringt ella smsa til borgarar, við tilboðið um at reinsa skorsteinin, nú tey vórðu í økinum hjá borgaranum.

Sambært § 6 í marknaðarføringslógini er tað ikki loyvt í vinnuvirksemi at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms ella telefon, uttan so, at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta.

Hetta hevur við sær, at bannað er at ringja til borgarar, við sølu fyri eyga, uttan samtykki frá teimum. Brúkaraumboðið metti eisini, at tað vóru skerpandi umstøður í hesum máli, tí at Orkað í nøkrum førum hevði ringt fleiri ferðir til somu borgarar, hóast teir høvdu sagt frá, at teir ikki ynsktu at verða uppringdir av felagnum.

Brúkaraumboðið hevur meldað fyritøkuna Orkað til løgregluna fyri at hava framt brot á marknaðarføringslógina.

Brot á § 6 verður revsað við bót.

## Samtykki til marknaðarføring kann fáast við kappingum

Brúkaraumboðið hevur viðgjørt nøkur mál, sum fevna um treytir í sambandi við kappingar.

Brúkaraumboðið skal gera vart við, at til ber hjá vinnurekandi, at hava treytir, tá tey skipa fyri kappingum. Til dømis kann ein treyt verða, at mann skal samtykkja til at móttaka marknaðarføring frá tí vinnurekandi.

Brúkaraumboðið skal tó gera vart við, at um tann vinnurekandi velur at skipa fyri kapping við treytum, so er tað av týdningi, at tað er greitt fyri borgaranum, hvat tað er hann gevur samtykki til.

Endamálið við forboðnum fyri óumbidnum áheitanum er nevniliga at verja "privatlivets fred". Endamálið er harumframt, at verja borgarar ímóti at verða trýstir av vinnurekandi til at innganga avtalur, sum borgarin ongan áhuga hevur í.

Sum marknaðarføringslógin er orðað, er tað einans loyvt at venda sær til borgarar, sum frammanundan hava givið eitt samtykki til at móttaka marknaðarføring frá hesi fyritøkuni.

Velur tann vinnurekandi at skipa fyri treytaðari kapping, so hevur tað alstóran týdning, at hann ikki dylur ella fjalir, at endamálið er at fáa eitt samtykki frá borgaranum. Tað er sostatt ikki nóg mikið at upplýsingar um vavið á samtykkinum eru fjaldar undir "les meira".

Tað skal sostatt skiljast klárt og týðiligt fyri borgaranum, at hann samtykkir til marknaðarføring frá fyritøkuni við at luttaka í kappingini. Við øðrum orðum, skal tann vinnurekandi leggja minst líka stóran dent á treytirnar, sum sjálva kappingina.

# Fyrispurningar frá vinnurekandi um, hvussu røkkast kann út til borgarar á lógligan hátt

Tað kann verða trupult hjá vinnurekandi at marknaðarføra vørur og tænastur til borgarar, men kortini halda seg innanfyri spammforboðið í marknaðarføringslógini. Útvaldir eru tríggjar fyrispurningar frá ymiskum vinnurekandi, sum ynsktu at røkka út til borgaran á ein lógligan hátt, og hesi verða umrødd í her.

Tveir av fyrispurningunum snúðu seg um vinnurekandi, sum spurdu, um til bar at leggja lepar við kunning um teirra fyritøku í postkassar hjá borgarum, tá einki samskifti hevði verið frammanundan við hesar borgarar, og tískil einki samtykki varð fingið frá teimum til at móttaka kunning.

Tann triði fyrispurningurin snúði seg um ein vinnurekandi, sum ynskti at røkka longur út við virksemi sínum, og spurdi tí, hvørjar møguleikar hann hevði. Hann spurdi um til bar at senda beinleiðis kunning um virksemi sítt til almennar stovnar, so sum skúlar, og kunna um ymiskt, sum fyritøkan hevði at bjóða.

Brúkaraumboðið greiddi teimum vinnurekandi frá reglunum um spammforboðið í marknaðarføringslógini.

Víst varð millum annað á, at loyvt er at leggja kunning um virksemi sítt í postkassarnar hjá borgarum. Spammforboðið í § 6 í marknaðarføringslógini er galdandi, tá talan er um beinleiðis marknaðarføring, sum verður send til borgarar á sms, teldupost og líknandi, har hesir frammanundan ikki hava givið sítt samtykki til at móttaka marknaðarføring frá hesum fyritøkum. Tá so einki samtykki er fingið til vega, ber til at marknaðarføra við at leggja lepar um kunning í postkassarnar hjá borgarunum.

Til tann triðja fyrispurningin, sum snúði seg um, um til bar at senda kunning til almennar stovnar, svaraði Brúkaraumboðið, at almennir stovnar og onnur vinnurekandi eru í líka stóran mun vard av spammforboðnum í marknaðarføringslógini sum privatir borgarar.

Brúkaraumboðið vísti harumframt á, at tað ikki er allur teldupostur og øll sms frá vinnurekandi, sum eru fevnd av spammforboðnum. Tað eru bert áheitanir, sum verða sendar við tí í hyggju at selja vøru, tænastuveitingar o.a. Kortini er ikki kravt, at áheitanirnar hava ítøkilig tilboð ella vøruumrøðu. Sokallað ”branding” ella umdømisbyggin av virkinum er eisini fevnt av spammreglunum.

Brúkaraumboðið vísti at enda á, at einki í marknaðarføringslógini tó forðar fyri, at tann vinnurekandi vendir sær til fysiskar persónar ella skúlar við einum fysiskum brævi í postkassan. Á henda hátt ber tískil til at senda út marknaðarføring til brúkarar og onnur vinnurekandi á ein lógligan hátt.

# Kapittul 4

## Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung

Sambært § 8, stk. 1 í marknaðarføringslógini er týðuliga ásett, at fyritøkur skulu vísa atlit, tá tær marknaðarføra mótvegis børnum og ungum. Børn og ung eru løtt at ávirka og vanta royndir og evni til at meta um ymisk viðurskifti. Ung og serliga minni børn megna ikki, ella hava trupult við, at gjøgnumskoða og meta um kunning.

Sambært § 8, stk. 2 í marknaðarføringslógini, má marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð. Tað framgongur eisini av ásetingini, at marknaðarføring, ið vendir sær til henda bólk, ikki á ósømiligan hátt má brúka harðskap, ótta ella pátrúgv sum ávirkanaramboð.

Tá ein fyritøka hevur børn og ung sum málbólk, má hon taka atlit til henda bólk av ungum brúkarum ella kundum, og átaka sær sína etisku ábyrgd. Í lógini er lagt upp til, at fyritøkurnar eru tilvitaðar um hesa ábyrgd, ið við fyrimuni kann handfarast umvegis egnar etiskar reglugerðir.

Í 2024 hevði Brúkaraumboðið nógv mál, sum snúðu seg um børn og ung, og marknaðarføring, og verða tey umrødd niðanfyri.

## Børn og ung brúkt í marknaðarátaki hjá Nema

Brúkaraumboðið fekk eina fráboðan, har víst var til eitt skriv frá Nema til 7. flokkar í Vágs -, Porkeris – og Sumbiar skúla. Borgarin helt, at talan var um sera ágangandi framferð, og vildi vita um tað var lógligt at gera 13 ára gomul til “seljarar” og veita stuðul afturfyri.

Í skrivinum verða ung í 7. flokki eggja til at hjálpa Nema við at fáa fleiri kundar. Hetta verður gjørt á tann hátt, at um ein kundi flytur haldið sær til Nema, so fer virðið av mánaðarliga gjaldinum beinleiðis til flokkin.

Nema vísti á, at skrivið av misgáum varð stílað til børnini í 7. flokki. Skrivið varð ætlað foreldrunum og ikki børnunum. Nema hevði fingið eina umsókn um stuðul frá einum av foreldrunum, ið ynskti at savna pening til eina námsferð fyri flokkin. Nema vildi ikki geva beinleiðis fíggjarligan stuðul, men bjóðaði í staðin fram alternativar mátar, har tey í samstarvi við Nema kundu savna pening til námsferðina. Skrivið er síðani lagt á ein bólk á Facebook.

Brúkaraumboðið metti tó, at fleiri orðingar í sjálvum skrivinum bendu á, at skrivið var

ætlað børnunum – ella í øllum førum, at skrivið eisini var ætlað børnunum.

Skrivað varð m.a. soleiðis í skrivinum:

- *“Vit vilja bjóða tykkum møguleikan at savna pengar til tykkara námsferð”*
- *“Um ein kundi skuldi flutt síni telefon – og internethald til okkum, so hevði virðið av mánaðarliga gjaldinum farið beinleiðis til tykkum”*
- *“Tit eru 27 í flokkinum og 20 av tykkum hava hald aðrastaðni enn hjá Nema... Um hesi fluttu síni hald til okkum, so høvdu tit innsavnað 20.000kr. bara í flokkinum”*
- *“Um tit ynskja at innsavna meir enn hetta, so kunnu tit spyrja ommur, abbar, vinir og familjulimir”*

Brúkaraumboðið metti, at talan var um ein órímiligan framferðarhátt, og at Nema hevði framt brot á góðan marknaðarføringssið sambært § 1 í marknaðarføringslógini. Harafturat var skrivið eisini í stríð við § 8, stk. 1 í marknaðarføringslógini, sum ásetir, at marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung, skal taka atlit til natúrliga góðtrúnið hjá børnum og ungum, og teirra vantandi royndum og vantandi evni at meta um ymisk viðurskifti, sum hava við sær, at tey eru løtt at ávirka og ímerkja.

Brúkaraumboðið góðtók frágreiðingina hjá Nema um, at tað ikki var ætlanin, at brúka børnini í sølu – og marknaðarætlanunum, og at tað var eitt mistak, at brævið varð stílað til 7. flokkarnar.

Í hesum sambandi hevði tað týdning fyri Brúkaraumboðið, at brævið bert var sent til eitt foreldur, og ikki til børnini, umframt at Nema tók skrivið aftur beinanvegin Brúkaraumboðið gjørdi vart við tað.

## Lýsing, ið eggjar ungum til rúsdrekkanýtslu, varð strikað

Brúkaraumboðið fekk nakrar fráboðanir um, at Bong.fo hevði lýsing fyri útgerð í sambandi við rúsdrekkanýtslu á Facebook síðuni hjá fyritøkuni.

Í lýsingini varð eggja ungum at keypa eina ølbong ella eina dupulta ølbong til ársins dyst millum Glasir og Kambsdal. Lýsingin vendi sær til eitt ítróttatiltak fyri miðnámsskúlanæmingar, og tískil metti Brúkaraumboðið, at lýsingin eisini vendi sær til ung undir 18 ár.

Í lýsingini varð millum annað skrivað, *”Bongin 2,0 – Tín trúfasti fylgisveinur til dystin! Hetta er ikki bara ein Ølbong; tað er ein uppliving, ið økir um stemningin.”* og *”Dupult Bongin – Fordoplaði stuttleikin, fordoplaði Ballið! Perfekt til at deila gleðina við einum vini.”*

Brúkaraumboðið metti, at lýsingin á Facebook eggjaði ungum – eisini ungum undir 18 ár – til alkoholnýtslu. Eisini metti Brúkaraumboðið, at lýsingin eggjaði ungum til vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, tí at lagt varð upp til at kulka øl í seg.

Í § 8 í marknaðarføringslógini eru serligar reglur fyri marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung undir 18 ár.

Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung, skal taka atlit til natúrliga góðtrúnið hjá børnum og ungum, og teirra vantandi

royndir og vantandi evni at meta um ymisk viðurskifti, sum hava við sær, at tey eru løtt at ávirka og ímerkja.

Marknaðarføringslógin ásetir eisini, at marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung, ikki beinleiðis ella óbeinleiðis má eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella til aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, ella á annan ósømiligan hátt brúka harðskap, ræðslu ella pátrúgv.

Brúkaraðumboðið bað felagið um, at tryggja at lýsingarátøk á øllum sosialum miðlum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til alkoholýtslu, ella til aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, ikki verða víst fyri persónum undir 18 ár.

Um tað ikki bar til at seta aldursfiltur á, varð fyritøkan biðin um at taka lýsingina av alt fyri eitt.

Eftir, at Brúkaraumboðið hevði sett seg í samband við fyritøkuna, varð uppslagið strikað beinanvegin. Brúkaraumboðið gjørdi tískil ikki meira við málið.

## Fyrispurningur um “product placement” í barnabók

Brúkaraumboðið fekk ein fyrispurning frá einum borgara, sum ætlaði at gera eina barnabók til børn undir skúlaaldur. Spurt varð, um loyvt er at gera eina barnabók við sokallaðum “product placement” í bókini. “Product placement” ella vøru plasering inniber, at vørumerkir ella nøvn á virkjum verða sett inn í bókina.

Í hesum føri ynskti persónurin at vita, um loyvi var at nevna ella lýsa fyri vørum frá ávísum føroyskum fyritøkum ella vísa á ymiskar føroyskur fyritøkur sum ein part av søgugongdini í bókini.

Brúkaraumboðið vísti á, at generelt er Brúkaraumboðið sera skeptisk, tá talan er um marknaðarføring til børn og ung.

Ásetingin í § 8 í marknaðarføringslógini fevnir um børn og ung frá 0-18 ár. Hetta er ein stórur aldursbólkur, og tí má hyggjast ítøkiliga eftir hvørjum einstøkum máli sær.

Har er ikki eitt endaligt forboð í marknaðarføringslógini ímóti at gera slíkar bøkur, men tess yngri børnini eru, meira varsemi krevst.

Brúkaraumboðið greiddi frá, at tað skal greitt og týðiliga upplýsast í bókini, at talan er um lýsingar. Tó metti Brúkaraumboðið, at um málbólkurin er børn undir skúlaaldur, so er sera ivasamt, um tað yvirhøvur ber til at upplýsa nóg týðiligt í eini bók, at talan er um lýsingar. Børn undir skúlaaldur eru nokk ikki før fyri at skilja hvat orðið “lýsing” merkir ella hvat hetta inniber.

Brúkaraumboðið vísti á, at tað var torført at koma við eini endaligari niðurstøðu áðrenn man hevur sæð bókina, men Brúkaraumboðið mælti avgjørt frá, at lýsingar verða brúktar í barnabókum!

# Umrøða av rúsdrekka í ungdómssending

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning frá borgara um ungdómssending í Kringvarpinum, har vertirnir vóru og vitjaðu á OY. Í sendingini varð greitt frá ølframleiðsluni, vørum og eisini vóru smakkiroyndir av trimum ølum. Brúkaraumboðið greiddi frá, at sendingar í Kringvarpinum sum útgangsstøði ikki eru fevndar av marknaðarføringslógini, tí talan vanliga er um redaktionelt tilfar og ikki um lýsingatilfar.

Tó kunnu sendingar í ávísum førum verða fevndar av marknaðarføringslógini, og tí setti Brúkaraumboðið seg í samband við Kringvarpið fyri at kunna um reglurnar.

### Nær er talan um eina lýsing, og nær er talan um redaktionelt tilfar?

Í § 4, stk. 1 í marknaðarføringslógini er ásett, at ein lýsing skal vera soleiðis háttað, at lýsingin týðiliga verður uppfatað sum ein lýsing, uttan mun til hvønn form lýsingin hevur, og hvørjum miðli lýsingin verður borin fram í.

Um tað hinvegin er talan um redaktionelt tilfar, so er ikki talan um eina lýsing.

Tað kann verða ringt hjá brúkarum at skilja í millum, nær talan er um redaktionelt tilfar og nær talan er um lýsingar.

Fyri at tað skal vera flokkað sum redaktionelt tilfar, er neyðugt, at hetta er grundað á greið journalistisk atlit og at sendingin hevur eitt kunningarvirði.

Brúkaraumboðið greiddi Kringvarpinum frá, at tað er týdningarmikið at brúkarar fáa upplýst, at talan er um redaktionelt tilfar. Tað kann til dømis vera, at Kringvarpið sjálvt rindar fyri ølið, ið verður smakkað, at journalistarnir hava eina ávísa vitan innan fakið og fáa tímaløn fyri arbeiðið.

Um Kringvarpið hinvegin hevði fingið ølið ókeypis, ella á annan hátt, fingið ein ágóða av sendingini, so kann talan vera um eina fjalda lýsing fyri OY, og sum hevði verið í stríð við § 4, stk. 1 í marknaðarføringslógini.

### Ungdómssending

Í § 8 í marknaðarføringslógini er ásett, at marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung (upp til 18 ár), má ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til alkoholnýtslu. Greinin sæst niðanfyri:

*"§ **8.** Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung, skal taka atlit til natúrliga góðtrúnið hjá børnum og ungum, og teirra vantandi royndir og vantandi evni at meta um ymisk viðurskifti, sum hava við sær, at tey eru løtt at ávirka og ímerkja.*

*Stk. 2. Marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung, má ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella til aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, ella á annan ósømiligan hátt brúka harðskap, ræðslu ella pátrúgv."*

Brúkaraumboðið greiddi Kringvarpinum frá, at tá talan er um eina ungdómssending, har tað eisini kann væntast at ung undir 18 ár lurta við, verður mælt til, at 18 ára aldursmarkið fyri at keypa øl/rúsdrekka verður nevnt í sendingini.

# Einki aldursmark á kapping, har vinningurin var ífylla til varrarnar

Brúkaraumboðið legði merki til eina kapping á Facebook síðuni hjá eini fyritøku, har til bar at vinna ífyllu til varrarnar, ella sokallað “lipfiller” til sín og eina vinkonu, har einki aldursmark var sett á hesa kapping.

Brúkaraumboðið vísti á, at í § 8, stk. 2 í marknaðarføringslógini er ásett, at marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung, ikki beinleiðis ella óbeinleiðis má eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella til aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, ella á annan hátt brúka harðskap, ræðslu ella pátrúgv.

Orðingin í marknaðarføringslógini “børn og ung” verður tulkað sum børn og ung undir 18 ár. Aldursmarkið fyri at hava ein vanga á Facebook er 13 ár, og tískil fevnir hetta málið um aldursbólkin 13-17 ár. Henda kapping vendi sær til allar fylgjararnar hjá fyritøkuni. Hóast kappingin vendir sær til ein breiðan skara, og ikki serliga til børn og ung í aldrinum 13-17 ár, so metti Brúkaraumboðið, at kappingin eisini vendi sær til børn og ung millum 13-17 ár, sum hava Facebook og sum fylgja fyritøkuni.

Brúkaraumboðið gjørdi harafturat vart við, at tað er 18 ára aldursmark fyri at fáa kosmetiska viðgerð, og tí eigur tað ikki at vera møguligt, at børn og ung undir 18 ár kunnu luttaka og vinna kosmetiskar viðgerðir.

Brúkaraumboðið vísti at enda á, at fyritøkan átti at upplýst klárt og týðiligt fyri borgarunum, at kappingin einans var galdandi fyri tey sum eru 18 ár og eldri.

Fyritøkan rættaði henda feil beinanvegin, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

# Kapittul 5

## Prísmarknaðarføring

Í § 13 í marknaðarføringslógini er ásett, at:

*“Í samband við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld.”*

Marknaðarføringsprísir, ið venda sær til brúkarar, skulu altíð vera íroknað mvg. Tað er ikki nóg mikið at upplýsa, at mvg verður lagt afturat. Prísur kann bert upplýsast uttan mvg, um marknaðarføringin einans vendir sær til vinnuligt virksemi. Tað skal verða greitt tilskilað í lýsingini, at marknaðarføringin einans vendir sær til vinnuligt virksemi.

Um marknaðarføringin vendir sær til bæði brúkarar og vinnufyritøkur, kanst tú velja at upplýsa prís uttan mvg, um prísurin við mvg eisini verður upplýstur. T.d. kann prísmarknaðarføring til bæði brúkarar og vinnuna vera: 125 kr. (100 kr. u/mvg)

Um tú sum vinnurekandi ivast í, um marknaðarføringin vendir sær til bæði brúkarar og vinnufyritøkur, eigur tú at upplýsa prís við og uttan mvg.

Brúkaraumboðið hevur valt nøkur mál út, sum verða umrødd niðanfyri.

## Bilasølan Sp/f Arctic fekk 10.000 kr í bót

Í februar 2021 meldaði Brúkaraumboðið bilasøluna Sp/f Arctic fyri at hava framt 18 brot á marknaðarføringslógina. Tann 15 mai 2025 var málið fyri í Føroya Rætti, og dómur varð sagdur. Brúkaraumboðið fekk viðhald í málinum. Bilasølan Sp/f Arctic fekk 10.000 kr. í bót.

Málið fevnir um, at á heimasíðuni, bilimport.fo vórðu el-bilar lýstir til sølu uttan mvg. Hetta var í stríð við § 13 í marknaðarføringslógini, sum ásetir, at tá kunnað verður um prísir á vørum og tænastum í sølulýsingum, ella aðrari marknaðarføring til brúkarar, skal upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað meirvirðisgjald. Hetta fyri at brúkarin skjótt og ómakaleyst kann síggja hvør samlaði prísurin á vøruni er.

Brúkaraumboðið heitti á bilasøluna um at rætta prísupplýsingarnar beinanvegin, men hetta varð ikki gjørt. Brúkaraumboðið meldaði tí málið til løgregluna.

Skipanin við el-bilum ger, at tað er møguligt at fáa upp til 70.000 kr. av mvg-num endurrindað. Tí metir Brúkaraumboðið, at tað er í lagi, at bilasølur eisini upplýsa um prísin eftir mvg-afturberingina. Men vísast skal á, at samlaði prísurin við mvg skal verða týðiliga upplýstur.

Krøvini til prísupplýsingar skulu eisini gera tað møguligt hjá brúkarum at samanbera prísir á vørum innan sama vørubólk og hjá ymsum vinnurekandi. Hetta stuðlar undir eini vælvirkandi prískapping.

## Sama song uppá tilboð, men ymiskir undanprísir

Brúkaraumboðið fekk nakrar fráboðanir um eina fyritøku, sum hevði eina song uppá tilboð eina viku fyri 6.500 krónur, har undanprísurin varð 12.999 krónur, og næstu vikuna varð sama song sett uppá tilboð fyri 7.200 krónur, har víst varð á ein undanprís áljóðandi 14.399 krónur.

Brúkaraumboðið vendi sær til fyritøkuna beinanvegin, og bað um frágreiðing uppá hesar fráboðanir.

Brúkaraumboðið greiddi fyritøkuni frá reglunum um prísmarknaðarføring í marknaðarføringslógini, og vísti á, at tá talan er um tilboð, skal prísurin verða niðursettur í mun til egnan prís. Vinnurekandi skulu kunna skjalprógva, at hava havt eina ávísa sølu av vøruni í einum tíðarskeiði á minst seks vikur, beint undan søluátakinum. Um prísurin í seks viku tíðarskeiðnum er ymiskur, kann bert samanberast við lægsta prísin í tíðarskeiðinum.

Hetta merkir í hesum ítøkiliga føri, at lægsti prísurin fyri songina í tí seinna tilboðnum átti at verið 6.500 krónur, tí tað er tað lægsta sum songin hevur kostað, um hugt verður 6 vikur aftur í tíð. Í hesum føri vísti handilin á ein prís áljóðandi 14.399 krónur, sum enntá er hægri enn undanprísurin var fyrru vikuna.

Handilin umbar fyri henda feil, og rættaði hann beinanvegin.

Brúkaraumboðið skal umframt vísa á, at meðan tilboðið koyrir ber ikki til at broyta undanprísin á vøruni.

### Pakkatilboð ella samansett tilboð

Tá fleiri vørur eru savnaðar undir einum tilboði er talan um pakkatilboð ella tað sum á donskum eitur “kombinationstilbud”.

Brúkaraumboðið hevur somu fatan sum danska brúkaraumboðið á hesum øki. Í vegleiðing hjá danska brúkaraumboðnum um prísmarknaðarføring, verður víst á, at pakkatilboð bróta ikki vanliga tíðarskeiðið fyri ta einstøku vøruna.

Niðanfyri verður víst eitt dømi um pakkatilboð av plastikkassum:

Til ber at siga, at ein plastkassi kostar vanliga 29,95 krónur, men í eina viku ber

til at keypa 3 fyri 2. Hetta pakkatilboð er tó ikki til hindurs fyri, at handilin síðan setir ein av hesum kassunum til sølu næstu vikuna fyri eitt nú hálvan prís, og upplýsir, at vanligur prísur er 29,95 krónur. Hetta er tí, at pakkatilboðið ikki brýtur av 6 viku tíðarskeiðið.

Tó kann ein samanlíkning við ein vanligan egnan prís verða villleiðandi í teim førum, har vøran sera sjáldan er til sølu fyri vanligan prís. Tá kann prísurin sostatt ikki roknast sum ein vanligur prísur longur.

## Fyritøka upplýsti ikki um ómaksgjald

Borgari vendir sær til Brúkaraumboðið um eina fyritøku, ið ikki upplýsti um avgreiðslugjald, har sum prísurin var lýstur. Borgarin greiddi frá, at tá hon fór inn á heimasíðuna hjá fyritøkuni, var prísurin fyri tiltakið kr. 125,00. Men tá hon so skuldi gjalda, kom kr. 10,00 í avgreiðslugjaldi afturat fyri hvørt atgongumerki, umframt 43 oyru í kortgjaldi. Brúkarin vendir sær tí til Brúkaraumboðið, og greiddi frá, at tað var bara gjørligt at keypa atgongumerkið á netinum, og tí slapp hon ikki undan at gjalda hesi avgjøld.

Brúkaraumboðið vísti á, at vinnurekandi kunnu taka avgreiðslugjald/ómaksgjald o.l. fyri vørur og tænastur, tey veita. Men ásetingin um prísupplýsingar í § 13 í marknaðarføringslógini setir krav um, at tá selt verður til brúkarar, skal samlaður prísur altíð upplýsast. Í teimum føri, har eingin brúkari kann keypa atgongumerki uttan at gjalda avgreiðslugjald, eigur prísurin at vera upplýstur við avgreiðslugjaldi.

Avgreiðslugjaldið eigur at standa sama stað sum prísurin. Tað vil siga, at er prísurin marknaðarførdur á lýsingini á forsíðuni á heimasíðuni, eigur avgreiðslugjaldið eisini at standa har, soleiðis at brúkarin sær samlaða prísin beinanvegin.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, og bað um at upplýsa samlaða prísin fyri hvørt atgongumerkið. Hetta kann gerast antin við at prísurin verður lýstur íroknað ómaksgjald ella at upplýsa um prís + ómaksgjald. Avgerandi er, at brúkarin beinanvegin sær hvat samlaði prísurin er. Brúkarumboðið hevur gjørt nýggja vegleiðing um ómaksgjøld, og er hon send hesi fyritøku, og øðrum fyritøkum, ið heldur ikki upplýstu um avgjøld.

# Fyritøkur lýstu við ófullfíggjaðum prísi

Brúkaraumboðið fekk í 2024 nakrar fráboðanir frá borgarum um fyritøkur, sum lýstu prís uttan meirvirðisgjald. Fráboðanirnar snúðu seg um lýsingar á bæði heimasíðu og sosialum miðlum. Talan var um lýsingar fyri elbilar hjá fýra bilasølum, og eina fyritøku, ið veitir jarðhitaloysn.

Í § 13 í marknaðarføringslógini er ásett, at: *"Í sambandi við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt **týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald**, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld. Avgjøld ella útreiðslur, sum tann vinnurekandi ikki hevur skyldu til at krevja beinleiðis frá brúkaranum, eru ikki fevnd av 1. pkt., men skulu upplýsast fyri seg. Verða vørur bjóðaðar út elektroniskt til brúkaran við møguleika fyri at bíleggja, eru 1. og 2. pkt. eisini galdandi."*

Brúkaraumboðið setti seg í samband við hesar fyritøkur, og greiddi frá reglunum.

<u>Bilasølurnar:</u>

Tá prísir á motorakførum verða marknaðarførdir til brúkarar, skulu hesir vera við meirvirðisgjaldi. Skipanin við el-bilum ger, at tað er møguligt at fáa upp til 70.000 kr. av meirvirðisgjaldinum endurrindað. Tí metir Brúkaraumboðið, at tað er í lagi, at bilasølur eisini upplýsa um prísin eftir mvg-afturberingina. Men Brúkaraumboðið vísti eisini á, at samlaði prísurin við mvg skal altíð verða týðiliga upplýstur.

Tann eina bilasølan spurdi Brúkaraumboðið um prísurin á gjaldi fyri levering og gjald fyri rustviðgerð eisini skuldi upplýsast saman við prísinum. Brúkaraumboðið greiddi frá, at tá talan er um gjald fyri levering, so er talan um útreiðslur, sum kundin í hesum føri altíð má rinda til bilasøluna, fyri at fáa bilin. Tá eigur tann kostnaðurin at vera innroknaður í prísin.

Er talan hinvegin um gjald fyri rustverju, so er hetta ein eykatænasta, sum ikki skal roknast upp í prísin. Tí skal hesin kostnaður upplýsast fyri seg.

Fyritøkan, ið hevði lýsing uppá jarðhitaloysn:

Í lýsingini var bara ein prísur upplýstur, og tað var prísurin uppá vøruna, tá meirvirðisgjaldið er endurrindað. Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, og vísti á, at tað er í lagi at upplýsa hvat vøran kostar, tá meirvirðisgjaldið er afturborið, men tann fullfíggjaði prísurin, sum borgarin rindar av fyrstan tíð skal eisini altíð verða upplýstur. Víst varð eisini á, at tað eru ávísar treytir knýttar at endurrindanini av meirvirðisgjaldinum, sum skulu vera uppfyltar fyri at fáa meirvirðisgjaldið endurrindað. Tí er tað ikki altíð sikkurt, at meirvirðisgjaldið í heila tikið verður endurgoldið.

Fyritøkurnar ávikavist strikaðu og broyttu lýsingarnar og prísupplýsingarnar beinanvegin, og Brúkaraumboðið gjørdi tískil ikki meira við málini.

# Ja takk tilboð

Í november 2024 gjørdi Brúkaraumboðið stakroyndir av Ja takk tilboðum hjá ellivu ymiskum handlum, har kannað varð, um fyrr- og nú prísir vóru rætt upplýstir.

Stakroyndir vórðu gjørdar av áleið 50 vørum til samans.

Stakroyndir vóru gjørdar hjá hesum handlum: Koppur & Kanna, Eikin, Mammulig.fo, Vøruhúsið á Hjalla, EL-Handilin á Tvøroyri, Ambod.fo og Bygma Balslev. Harumframt vóru stakroyndir eisini gjørdar av matvøruhandlunum: Á við Sundsvegin, Inn í Klaksvík, Á í Fuglafirði og FK í Tórshavn.

Brúkaraumboðið bað tey vinnurekandi um at skjalprógva príslækkingina fyri fleiri “Ja takk tilboð”, soleiðis at staðfestast kundi, um talan var um verulig tilboð. Eisini kannaði Brúkaraumboðið, um handlarnir høvdu havt vøruna til sølu í rúma tíð undan tilboðnum.

Víst skal vera á, at sum upprunaprísur skal upplýsast tann lægsti prísurin, sum vøran hevur kostað tær síðstu 4 vikurnar, um talan er um matvørur ella aðrar gerandisvørur, og 6 vikur, um talan er um aðrar vørur so sum innbúgv, ting, klæðir o.s.fr. Um upplýsti upprunaprísurin ikki er rættur, kann talan verða um villleiðandi marknaðarføring. Eisini skal vísast á, at sambært marknaðarføringslógini, má útsøla ella onnur søla, har søluprísir eru lækkaðir, bert fráboðast, um so er, at príslækkingin er verulig. Príslækkingin skal, um neyðugt kunna skjalprógvast.

Úrslitini av stakroyndunum vóru misjøvn. Vøruhúsið á Hjalla og FK í Tórshavn megnaðu at skjalprógva undanprísin fyri allar vørurnar, ið spurt varð um fyri umbidna tíðarskeiðið. Hjá hinum handlunum vóru feilir í ella megnaðu teir ikki at skjalprógva undanprísin.

### Handilin ikki havt vøruna til sølu áður

Úrslitið av stakroyndunum vísti á ein afturvendandi trupulleika. Í fleiri førum vísti tað seg nevniliga, at handlar marknaðarføra eina vøru sum “Ja takk tilboð”, og vísa á ein undanprís sum ikki er veruligur, tí handilin als ikki hevur havt vøruna til sølu frammanundan tilboðnum. Hetta var galdandi fyri allar stakroyndirnar hjá Ambod.fo, og fyri einstakar stakroyndir hjá Á í Fuglafirði og Á við Sundsvegin. Brúkaraumboðið gav handlunum átalu fyri hesi brot.

Tá handlar ikki hava havt vøruna til sølu áður, ber ikki til at vísa á ein undanprís, tí har er eingin undanprísur. Verður orðið “tilboð” brúkt og víst verður á ein undanprís, skal hetta avspegla eina veruliga príslækking, har upplýsti undanprísurin er tað lægsta, sum vøran hevur kostað tær seinastu 4 ella 6 vikurnar. Brúkaraumboðið vísti á, at um vøran ikki hevur verið til sølu áður, ber til at brúka onnur hugtøk, so sum “*Ja takk prísur*”, “*góður prísur*”, “*sera bíligt*” el. líkn., um tann vinnurekandi vil gera vart við, at prísurin er serliga góður. Um talan

er um nýggja vøru, skal eingin undanprísur upplýsast.

Hjá Bygma Balslev vóru eisini onkrir feilir funnir. T.d. vísti tann eina stakroyndin, at ein vøra hevði verið til sølu í tvær vikur undan tilboðnum – har kravið er 4 vikur.

### Villleiðandi tilboð

Marknaðarføringslógin ásetur, at tá søluprísir eru lækkaðir, kann hetta bert fráboðast um príslækkingin er verulig.

Stakroyndirnar vístu, at Koppur & Kanna, í 2 út av 5 stakroyndum hava upplýst skeivan undanprís. Í tí eina førinum var talan um ein lægri undanprís í lýsingini, meðan Koppur & Kanna, í 1 út av 5 stakroyndum, og Á í Fuglafirði, í 1 út av 4 stakroyndum, hava upplýst ein hægri undanprís í lýsingini, enn hann í veruleikanum var. Brúkaraumboðið skal vísa á, at tað er sera álvarsamt at upplýsa skeivan undanprís, serliga tá talan er um ein hægri undanprís. Tað er villleiðandi fyri kundan, sum fær eina fatan av, at sparingin er størri, og tilboðið er betri, enn tað í veruleikanum er. Brúkaraumboðið hevur givið handlunum átalu fyri hesi brot.

Hjá Inn í Klaksvík vóru eisini feilir. Millum annað var ikki víst á upprunaligan prís á tilboðsvøru, hóast talan var um vøru, sum handilin vanliga hevði til sølu. Í slíkum føri eigur upprunaprísur at upplýsast.

### Manglandi telduskipan

Manglandi telduskipan við eini funktión at vísa prís aftur í tíð, hevur eisini verið ein orsøk til, at fleiri av handlunum ikki hava megnað at skjalprógva ein undanprís í ávikvist 4 og 6 vikur undan tilboðnum. Hesin trupulleikin vísti seg serliga hjá Mammulig.fo, Eikini og EL-Handlinum á Tvøroyri. Aðrir handlar høvdu eisini hesa avbjóðing, men hava kortini megna at leita fram sølukvittanir fyri seldu vørurnar, fyri at kunna skjalprógva undanprísin í umbidna tíðarskeiðnum á bestan hátt.

### Týdningurin av at gera stakroyndir

Brúkaraumboðið metir tað hevur stóran týdning at gera stakroyndir, tí tað virkar fyri, at vinnurekandi verða kunnaði um reglurnar, og at marknaðarátøk verða lýst á rættan hátt til frama fyri brúkaran. Brúkaraumboðið hevur havt samskifti við tey vinnurekandi um reglurnar í sambandi við sølufremjandi átøk og prísmarknaðarføring, og øll vinnurekandi vóru sera samstarvshugaði

## Keypstreytaðar kappingar – er tað loyvt?

Brúkaraumboðið fekk nakrar fyrispurningar um keypstreytaðar kappingar. At kapping er keypstreytað merkir, at brúkarin skal keypa eina vøru frá tí vinnurekandi fyri at sleppa at vera við í kappingini. Í tí eina førinum gjørdi ein borgari vart við, at ein klædnahandil hevði keypstreytaða kapping, har treytin fyri

luttøku var at keypa fyri minst 1.000 krónur.

Brúkaraumboðið skal vísa á, at keypstreytaðar kappingar hava áður verið ólógligar, men tað forboðið fór úr gildi í 2015. Tó verður víst á § 9, stk. 1 í marknaðarføringslógini, at brúkarin lættliga skal hava møguleika at kunna seg um treytirnar fyri kappingini. Virkið skal sostatt altíð gera brúkararnar varugar við korini fyri kappingini. Hetta merkir, hvørjar sertreytir knýta seg at luttøkuni.

## Hvussu skal søluprísur og eindarprísur upplýsast í lýsingabløðum?

Brúkaraumboðið hevði fund við lýsingafyritøku, umframt ein av teimum stóru matvøruhandlunum í Føroyum. Á fundinum var kunngerðin um sølupris og eindarprís gjøgnumgingin og umrødd.

Kunngerðin, sum varð umrødd er kunngerð nr. 15 frá 13. februar 2023 um upplýsingar til keypara um sølupris og eindarprís, sum seinast broytt við kunngerð nr. 37 frá 22. mars 2023.

Brúkaraumboðið vísti á, at tað er ikki lógarkrav at vísa, hvussu nógv borgarin sparir. Tað, sum verður kravt sambært lóggávuni er, at upplýsast skal um "fyrr og nú prísin".

### Avmarkað nøgd

Umframt hetta, so varð víst á, at tá tað er avmarkað nøgd av eini vøru, so skal hetta eisini upplýsast. Henda avmarkingin er ein meting, tí tað veldst um, hvussu gott tilboðið er, og um væntast kann ein stór søla av hesi vøru.

### Upplýsast í litrum

Á fundinum vísti Brúkaraumboðið m.a. á, at eftir at kravið um vørueindir er komið, er tað nú ikki nóg mikið at upplýsa um vøru í t.d. dunkum, men at eisini verður upplýst í litrum o.s.fr. Hetta er fyri at skapa meira gjøgnumskygni fyri brúkaran.

### Serlig krøv til frukt og grønmeti?

Matvøruhandilin spurdi um serlig krøv vóru til frukt og grønmeti. Her vísti Brúkaraumboðið á, at kravið um eindarprís ikki er galdandi fyri frukt og grønmeti, sum verður selt hvør sær ella í bundum ella í pottum. Hetta er sambært § 8, stk. 3, nr. 5 í kunngerðini um sølupris og eindarprís.

### "Spar upp til" loyvt?

Harafturat varð útsøgnin "spar upp til" umrødd. Brúkaraumboðið vísti á, at har er einki forboð fyri at brúka hesa útsøgn, men at her krevst varsemi, tí at henda útsøgn kann skjótt gerast villeiðandi. Tað vil verða ein meting, nær til ber at brúka hesa útsøgn, men í øllum føri, skal tað vera ein stórur partur av vøruni, har til ber at gera mestu sparingina.

### Hvat er vanligur prísur?

Umrøtt varð eisini, hvat er vanligur prísur, og hvat lýsir ein vanligan prís. Víst varð á,

at vanligi prísurin er tann lægsti prísurin, sum hevur verið síðstu fýra vikurnar fyri gerandisvørur, t.e. matvørur o.a.

Vanligi prísurin skal altíð upplýsast, og er tað av týdningi at hann er sjónligur fyri borgaran.

### Vøra, sum ongantíð hevur verið til sølu

Spurt varð síðan inn til vøru, sum ongan vanligan prís hevur, tí handilin ongantíð hevur havt vøruna til sølu áður, og hvussu tá skal marknaðarførast við tilboðið.

Brúkaraumboðið vísti á, at í slíkum føri ber til at skriva “”Bert”, “Sera bíligt”, “Góður prísur” ella “Prísur eftir hetta er ..”.

### Burðardyggar útsagnir

Hetta er eitt vaksandi øki, og hevur Brúkaraumboðið eyguni eftir, at hesar útsagnir verða brúktar rætt. Mælt verður til, at handlarnir eru ítøkiligir, tá teir brúka slíkar útsagnir.

Tað er tí ikki nóg gott, at skriva “umhvørvisvinarligt” ella “burðardygt”. Heldur skal skrivast “40% minni plast”, tvs., at útsagnir, sum til ber at máta verða brúktar.

# Kapittul 6

## Vinnulig eyðkenni

Sambært § 18 í marknaðarføringslógini mugu vinnurekandi ikki nýta vinnulig eyðkenni og tílíkt hjá øðrum, ella at nýta egin eyðkenni á ein hátt, sum kann elva til bland við eyðkenni hjá øðrum. Ásetingin er ein heildartreyt, sum m.a. verjir eyðkenni sum knýta seg at virkseminum hjá einstøkum vinnurekandi. Hetta kann m.a. vera vørumerki, firmanøvn o.a.

§ 18 í marknaðarføringslógini um vinnulig eyðkenni er soljóðandi:

*"Tað er ikki loyvt vinnurekandi at nýta vinnulig eyðkenni og tílíkt hjá øðrum, ella at nýta egin eyðkenni á ein hátt, sum kann elva til bland við eyðkenni hjá øðrum."*

Brúkaraumboðið viðgjørdi nøkur mál í 2024 um vinnulig eyðkenni, og verða tey umrødd niðanfyri.

## Vinnulig eyðkenni sæð út frá fýra ymiskum sjónarmiðum

Brúkaraumboðið fekk nakrar fyrispurningar og klagur frá vinnurekandi í 2024, sum vístu sína ónøgd um onnur vinnurekandi, tí tey mettu, at hesi brúktu vinnulig eyðkenni hjá teimum. Tað er sambært § 18 í marknaðarføringslógini ikki loyvt at nýta vinnulig eyðkenni hjá øðrum, um hetta kann elva til bland. Tó, so eru sett sera høg krøv til, nær § 18 í marknaðarføringslógini kann gerast galdandi.

### Vinnurekandi við sama navni

Tað fyrsta málið fevndi um ein vinnurekandi, sum fráboðaði um annan vinnurekandi við næstan sama navni. Talan var sostatt um sama navn, men har tøl vórðu løgd afturat tí eina navninum.

Klagarin metti tað verða óheppið, tá hann hevði brúkt hetta navnið í so mong ár, og at ein nýggjur vinnurekandi kallaði seg júst tað sama. Talan var um tvey vinnurekandi innan sama øki. Klagarin ynskti tí at vita, hvørji rættindi hann hevði.

Brúkaraumboðið vísti á, at tað eru sett sera høg krøv til, nær brot er framt á § 18 í marknaðarføringslógini. Tí varð farið undir at kanna, um elvast kundi til bland millum hesi bæði vinnurekandi, sum er tað, sum ásetingin leggur upp til.

Tað er sostatt ikki loyvt at nýta vinnulig eyðkenni, sum kunnu elva til bland við eyðkenni hjá øðrum. Talan er um eina heildartreyt, og skal henda treyt verða lokin.

Brúkaraumboðið kannaði, um har kundi verða vandi fyri at brúki hjá fyritøku A av heitinum kundi elva til bland við fyritøku B.

Fyri at verða vardur eftir marknaðarføringslógini krevst harumframt, at heitið á tí vinnurekandi, er so mikið innarbeitt, at hetta verður mett at verða eitt heiti, sum serliga eyðkennir hesa fyritøkuna. Upplýsingar í málinum bendu ikki á, at heitið hjá fyritøkuni var so mikið innarbeitt á føroyska marknaðinum, at tað forðaði hinari fyritøkuni at hava sama heiti.

Brúkaraumboðið legði eisini til grund, at um støðan var tann, at heitið á fyritøkuni var so mikið innarbeitt, at tað hevði notið vernd eftir § 18, so hevði verjan eisini verið avmarkað til, at partarnir skuldu verið í kapping við hvønn annan. Tað vil siga, at tað hevði eisini verið ein treyt, at partarnir vóru innan sama vøruslag.

Hóast partarnir vóru innan sama øki, so var ikki mett, at fyritøkurnar høvdu sama endamál, og at tískil kundi ikki elvast til bland millum hesar.

Í hesum ítøkiliga málinum kom Brúkaraumboðið til ta niðurstøðu, at brot ikki varð framt á 18 í marknaðarføringslógini um vinnulig eyðkenni.

## Kopiering av marknaðarføringshátti

Brúkaraumboðið fekk tvær fráboðanir, har tvær fyritøkur vildu vísa sína ónøgd um marknaðarføringsháttin hjá kappingarneytum teirra. Talan var í báðum førum um kappingarneyta, sum lýsti við júst somu vøru, har uppsetingin á lýsingini var sett upp á sama hátt sum tær hjá teimum.

Fyritøkurnar vendu sær til Brúkaraumboðið tí tær mettu hetta verða ótolandi, tá kappingarneytin á onkran hátt "stjelur" teirra marknaðarføringshátt.

Í tí eina førinum var talan um marknaðarføringsháttin hjá kappingarneytanum av somu vørum, har uppsetingin á tilboðnum varð sett upp á líknandi og í onkrum føri, sama hátt sum tann hjá fyritøkuni.

Í hinum førinum var talan um marknaðarføringsháttin hjá kappingarneytanum av somu uppliving. Upplivingin var júst hin sama, har sama heiti, og sama uppseting varð nýtt. Fyritøkan helt tað verða sera keðiligt, nú tey høvdu bjóðað hesa uppliving í nøkur ár, og metti, at tað kundi føra við sær misskiljingar, nú sama heiti eisini varð brúkt fyri báðar fyritøkurnar.

Sum í fyrra førinum, so fór Brúkaraumboðið undir at kanna, um brot varð framt á § 18 um vinnulig eyðkenni í marknaðarføringslógini.

Í tí førinum, har kappingarneyti nýtti sama marknaðarføringsháttin í samband við lýsingar av tilboðum av somu vørum sum fyritøkan, kom Brúkaraumboðið til ta niðurstøðu, at sera høg krøv eru til neyvleikan á líkleikanum fyri at verða vardur eftir § 18 um vinnulig eyðkenni. Mett varð ikki, at lýsingarnar í hesum føri komu undir hesa áseting.

Í tí seinna førinum, har kappingarneyti hevði brúkt sama marknaðarhátt í samband við sølu av somu uppliving, vísti Brúkaraumboðið á, at tað verða sett sera høg krøv til, nær eitt heitið nýtir verju sambært marknaðarføringslógini. Um eitt heitið skal verða vart eftir marknaðarføringslógini, so krevst, at heitið er serligt, kent og so mikið innarbeitt, at hetta verður mett at verða

eitt heitið, sum serliga eyðkennir hesa fyritøkuna.

Brúkaraumboðið metti orðini í heitinum verða vanlig orð, sum torført er at fáa verju fyri, tá talan er um vinnuligt eyðkenni. Tí, tá talan er um vanlig orð, so krevst at eyðkenni er serliga innarbeitt á føroyska marknaðinum.

Klagarin vísti eisini á, at hann helt vanda verða fyri, at misskiljingar kundu íkoma millum brúkarar. Brúkaraumboðið vísti á, at tá ein uppliving verður seld undir sama heiti, so er vandi fyri at bland kann íkoma millum hesi. Tó er tað ein treyt fyri at verða vardur eftir § 18 í marknaðarføringslógini, at talan eisini er um eitt vinnuligt eyðkenni, sum er sera innarbeitt, og var henda treyt ikki mett at verða lokin. Tí var tað í sjálvum sær ikki nóg mikið, at tað møguliga kundi íkoma misskiljing millum brúkarar.

Brúkaraumboðið metti sostatt í báðum førum, at brot ikki var framt á § 18 um vinnulig eyðkenni í marknaðarføringslógini.

## Er í lagi at brúka somu stytting sum ein onnur fyritøka brúkar?

Brúkaraumboðið fekk ein fyrispurning frá einum vinnurekandi, um tað var í lagi at brúka ta somu styttingina, sum ein onnur fyritøka longu brúkti.

Talan var um tvey vinnurekandi, men tey vóru ikki innanfyri somu vinnugrein.

Brúkaraumboðið fór undir at kanna, um vandi kundi verða fyri brotið á § 18 um vinnulig eyðkenni í marknaðarføringslógini.

Brúkaraumboðið vísti á, at § 18 í marknaðarføringslógini ikki avgerð, hvørji eyðkenni verða vard, og hvussu rættindini til hesi verða til. Ásetingin er býtt í tvey, har fyrsti partur fevnir um, tá ein fyritøka nýtir eitt navn ella eyðkenni hjá øðrum, har hetta er identiskt við eitt vinnuligt eyðkenni hjá øðrum. Seinna liði fevnir um føri, har tað er ein vandi fyri, at vinnuliga eyðkenni elvir til bland við vinnuliga eyðkenni hjá øðrum.

Í hesum ítøkiliga døminum, skal vandi sostatt vera fyri, at brúki av styttingini hjá fyritøku A skal elva til bland við eyðkenni hjá fyritøku B.

Hevði styttingin hjá fyritøkuni, sum hevur brúkt hesa í mong ár verið so mikið innarbeidd, at hon hevði notið vernd sambært § 18 í marknaðarføringslógini, so hevði verjan verið avmarkað til, at partarnir skuldu verið í kapping við hvønn annan. Tað vil siga, at tað hevði verið ein treyt, at partarnir vóru innan somu vinnugrein.

Brúkaraumboðið vísti tí vinnurekandi á reglurnar á økinum og rættarsiðvenju, sum vísir, at tað skal nógv til áðrenn mann kann nokta einum vinnurekandi at brúka somu stytting.

### Samanumtøka

Samanumtikið kann sigast, og sum dømini omanfyri vísa á, so verða tað sett høg krøv til, nær brot er framt á § 18 um vinnulig eyðkenni í marknaðarføringslógini.

Ásetingin er ein heildartreyt, sum við forboði verjir vinnulig eyðkenni og ymiskt innan hetta øki.

Reglan leggur upp til, at ávísar treytir skulu verða loknar áðrenn vinnurekandi verða vard, og kunnu hesar treytir verða torførar at lúka.

# Kapittul 7

## Forhandarmeting

Virkir og stovnar kunnu biðja Brúkaraumboðið um at gera eina sokallaða forhandarmeting um ætlaða marknaðarføring. Hetta er ein meting um ætlaða marknaðarføringin er í samsvar við marknaðarføringslógina, og er at meta sum ein vegleiðing heldur enn ein endalig støðutakan. Ábyrgdin fyri, at eitt marknaðarføringstiltak er lógligt liggur altíð hjá tí vinnurekandi.

Tá Brúkaraumboðið hevur latið eina forhandarmeting til ein vinnurekandi um, at eitt ætlað marknaðarføringstiltak eftir fatanini hjá Brúkaraumboðnum er lógligt, kann Brúkaraumboðið ikki av sínum eintingum mótvegis tí vinnurekandi reisa eitt mál í sambandi við eitt átak, sum er fevnt av forhandarmetingini og sett í verk innan rímiliga tíð eftir, at forhandarmetingin er latin.

Ein slík meting verður tó ikki gjørd, um støðutakanin kann skapa serligan iva, ella onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Vegleiðandi kann væntast, at tvær vikur ganga til viðgerðina av eini forhandarmeting. Hetta kann vera styttri ella longri alt eftir arbeiðsbyrðuni hjá Brúkaraumboðnum. Gott er tí at vera í góðari tíð við áheitan um forhandarmeting.

Útvald eru trý mál frá 2024, har virkir hava biðið Brúkaraumboðið um forhandarmeting í 2024, og verða tey umrødd niðanfyri.

## Lýsingafyritøka vendi sær til Brúkaraumboðið um ætlað lýsingaátak

Ein lýsingafyritøka vendi sær til Brúkaraumboðið um ætlað lýsingaátak. Lýsingaátakið fevndi um jarðhitaloysnir hjá eini fyritøku. Lýsingafyritøkan ynskti at fáa greiðu á, um loyvt er at upplýsa ein prís eftir, at meirvirðisgjaldi er afturborðið. Upplýst varð sostatt ikki, hvat jarðhitaloysnirnar kostaðu áðrenn meirvirðisgjaldið varð afturborðið. Altso var fulli prísurin, sum borgarin skuldi gjalda fyri jarðhitaloysnina, ikki upplýstur.

Brúkaraumboðið vísti á § 13 í marknaðarføringslógini, sum ásetur, at tá kunnað verður um prísir á vørum og tænastum í sølulýsingum, ella aðrari marknaðarføring, skal týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað t.d. meirvirðisgjald.

Lýsingafyritøkan broytti lýsingaátakið soleiðis, at bæði fullur prísur og prísurin eftir, at meirvirðisgjaldið var afturborðið, bleiv upplýst.

Út frá tí tilfari, sum Brúkaraumboðið hevði fingið, hevði Brúkaraumboðið ikki fleiri viðmerkingar og metti annars, at hetta átak var í tráð við marknaðarføringslógina.

## Ætlað lýsingaátak hjá bilasølu

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning frá bilasølu um ætlað lýsingaátak.

Bilasølan vísti í lýsingaátakinum á fíggingaruppskot, og var tað serliga henda partin bilasølan ynskti at fáa eina forhandarmeting uppá.

Átakið vísti á eitt útgjald, sum borgarin skuldi rinda beinanvegin, harumframt eina mánaðarliga upphædd, sum borgarin síðan skuldi rinda næstu mánaðarnar, umframt eina rentu.

Brúkaraumboðið hevði nakrar viðmerkingar til lýsingaátakið hjá bilasøluni.

Fyrst varð víst á § 14 í marknaðarføringslógini, sum ásetur, at í sambandi við útbjóðing av vørum við kredittkeypi skal upplýsast um:

- Kontantprís
- Kredittútreiðslurnar sum ein upphædd
- Árligu útreiðslurnar fyri kredittin í prosentum.

Ásetingin í § 14 gevur brúkarum møguleika at samanbera kontantprísin á eini vøru við, hvussu nógv, ið gjaldast skal, um vøran verður keypt uppá kreditt. Ásett er, at árligu útreiðslurnar í prosentum skulu tilskilast á ein eins týðiligan hátt og hinar kredittupplýsingarnar, tí hetta verður mett at vera ein týðandi upplýsing.

Brúkaraumboðið vísti eisini á, at tað fylgir av § 13 í marknaðarføringlógini, at tað týðiliga skal upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað øll gjøld og avgjøld.

Í hesum ítøkiliga lýsingaátakinum mælti Brúkaraumboðið sostatt til, at bilasølan upplýsti um kredittútreiðslurnar í alt, t.v.s. prísurin borgarin rindar íalt fyri at lána peningin, so sum rentur, stovningargjald v.m. Harumframt mælti Brúkaraumboðið til at upplýstur var ein samlaður prísur, t.v.s. hvat bilurin samlað kemur at kostað, tá lánið er afturgoldið, umframt árligu útreiðslurnar fyri kredittin í prosentum.

# Fyritøka vildi gera kapping við treytum

Brúkaraumboðið fekk ein fyrispurning frá eini fyritøku, sum ætlaði at gera eina kapping, har luttakarar samstundis góvu loyvi til, at fyritøkan kundi seta seg í samband við tey. Upplýst varð eisini, at ein lættliga kundi melda frá við at seta seg í samband við fyritøkuna.

Brúkaraumboðið vísti á, at sambært § 6 í marknaðarføringslógini, er tað ikki loyvt í vinnuvirksemi at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms ella telefon, uttan so, at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta. Hetta hevur við sær, at bannað er at ringja til borgarar, við sølu fyri eyga, uttan samtykki frá teimum.

Kappingin, sum fyritøkan ætlaði at hava, var treytað av, at fyritøkan kundi seta seg í samband við luttakararnar. Hetta er í lagi, um tað stendur greitt og týðiligt.

Brúkaraumboðið helt, at dentur átti at verið lagdur á samtykki fram um kappingina. Tað skal vera púra greitt, hvat fólk geva sítt samtykki til.

Brúkaraumboðið metti ikki í hesum føri, at tað nóg greitt framgekk av kappingini, á hvønn hátt fyritøkan setti seg í samband við luttakararnar. Heitt varð tí á fyritøkuna at skriva, at fyritøkan setir seg í samband við luttakararnar við at ringja til tey.

Harafturat varð víst á § 6, stk. 2 í marknaðarføringslógini, sum ásetur, at borgarin til eina og hvørja tíð skal hava møguleikan fyri, ómaksleyst og ókeypis, at biðja seg undan hesum, bæði í sambandi við at hann letur tí vinnurekandi fartelefonnummari, og tá hann seinni fær áheitanir frá tí vinnurekandi.

Harafturat vísti Brúkaraumboðið á, at um ringt verður til børn og ung undir 18 ár, fyri at selja vørur og tænastur, so krevst samtykki frá foreldrunum.

# Kapittul 8

## Gjaldslóg

Umframt at umsita og hava eftirlit við marknaðarføringslógini, so umsitur Brúkaraumboðið eisini ein part av gjaldslógini. Talan er um “Anordning nr. 1223 frá 4. juni 2021 om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger”.

Hóast gjaldslógin er torgreidd, so fyllir arbeiðið við gjaldslógini meira enn nakrantíð áður, og er tað ein vaksandi áhugi fyri hesum øki.

Nakrar ásetingar í gjaldslógini fylla meira enn aðrar, har § 81 um kontantregluna, og § 96 um elektroniskan pening, fylla mest í arbeiðinum hjá Brúkaraumboðnum.

Niðanfyri verða umrødd nøkur mál hjá Brúkaraumboðnum um gjaldslógina, umframt at víst verður á vegleiðingar o.a.

## Óheimilað nýtsla av gjaldskorti

Brúkaraumboðið viðgjørdi klagu, sum fevnir um sms-boðini, sum verða send út, í sambandi við, at kundar skulu virkja sítt kort í Apple Pay. Klagarin metti ikki, at sms-boðini vóru nóg greið til at borgarar skiltu álvaran í teimum.

Klagarin hevði keypt klæðir á netinum, og fekk seinni eini sms-boð, ið sóu út til at koma frá PostNord, við boðum um at rinda eitt lítið gjald við at trýsta á eina leinkju.

Tá klagarin hevði opnað leinkjuna og inntastað kortupplýsingarnar, fekk hann eini soljóðandi sms-boð frá BankNordik:

*”Tú ert við at virkja kortið í Apple Pay. Kotan virkar í ein tíma og er (xxxxxx).*

*Ring til +298 330330, um tú ikki hevur bílagt kotuna.”*

Klagarin tøppaði síðani kotuna inn.

Ein góðan minutt aftaná, fekk hann eini soljóðandi sms-boð frá BankNordik:

*”Títt Mastercard kort, sum endar við (xxxx), kann nýtast í smb. við Apple Pay”*

Síðani vórðu yvir 8.000 kr. tiknar av kortinum, áðrenn kortið varð sperrað av Fraud Monitoring deildini hjá Nets.

BankNordik hevur víst á, at hóast bæði sms-boðini greitt ávaraðu um, at kundin (klagarin) hevur virkjað kortið í Apple Pay, so fekk hetta ikki kundan at reagera, hóast hann bara skuldi gjalda kr. 22,24 til Post Nord, sum einki hevði við Apple Pay at gera. BankNordik metir, at hetta er “groft uforsvarlig adfærd” ið hevur gjørt misbrúkið møguligt, og tí skal kundin

hefta fyri kr. 8.000,- sambært § 100, stk. 4, nr. 3 í gjaldslógini.

Klagarin metti hinvegin, at hann bert skuldi hefta við kr. 375, sambært § 100, stk. 3 í gjaldslógini, tí at sms-boðini frá BankNordik vóru ikki nóg greið til at borgarar skiltu álvaran í teimum. Tískil var ikki talan um *«groft uforsvarlig adfærd».*

### Niðurstøða

Brúkaraumboðið metti ikki, at orðingin í sms-boðunum frá BankNordik í nóg stóran mun kunnar ella ávarar brúkaran, soleiðis at ein vanligur brúkari skilur, at okkurt er áfatt og at kotan, sum viðkomandi móttekur, tá eitt kort verður virkja í Apple Pay, ikki má latast víðari.

Brúkaraumboðið metti ikki, at BankNordik hevur sýnt reiðiligan handilssið og góða siðvenju innan sítt virkisøki, sambært § 42, stk. 1 í gjaldslógini, og bað tí BankNordik um at orða boðini greiðari, so at borgarin hevur eitt betri grundarlag fyri at skilja álvaran í málinum.

BankNordik hevur upplýst, at bankin hevur endurgoldið klagaranum alla upphæddina, burtursæð frá 375 kr. Eisini er bankin farin undir at umorða sms-boðini, soleiðis at tað gerst enn greiðari fyri kundan, at tað er neyðugt at hugsa seg um, fyri at tryggja sær, at talan ikki er um misbrúk.

### Lógargrundarlag

Brúkaraumboðið hevur heimild at viðgera, um boðini frá BankNordik eru nóg fullfíggjað og greið til at borgarin skilur álvaran í teimum. Meira ítøkiliga, er spurningurin serliga um BankNordik, í nóg stóran mun, hevur orðað síni sms-boð, greitt og týðiligt, soleiðis at ein vanligur brúkari skilur at okkurt er áfatt og at kotan, sum viðkomandi móttekur, ikki má latast víðari.

Brúkaraumboðið tekur hinvegin ikki ítøkiliga avgerð um borgarin skal hefta við 8.000 kr. ella við 375 kr. Tað er “Det Finansielle Ankenævn” sum viðger ítøkilig mál millum borgara og peningastovn.

Heimildin hjá Brúkaraumboðnum er í § 144 í gjaldslógini, sum m.a. ásetir, at “*Brúkaraumboðið fører tilsyn med kapitel 5 og §§ 117-119, 124 og 125, og at virksomhederne over for forbrugere overholder kapitel 6 og § 42, stk. 1, og regler udstedt i medfør af § 42, stk. 2.*”

Sambært § 42, stk. 1 hevur Brúkaraumboðið eftirlit við, at peningastovnar halda kravið um reiðiligan handilssið og góða siðvenju mótvegis brúkarum.

## Fyritøka noktaði borgara at gjalda kontant

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá borgara, um at ein matstova ikki tók ímóti reiðum peningi. Borgarin hevði fingið hetta at vita frá matstovuni, og var tað eisini upplýst á teirra Facebook vanga.

Í § 81 í gjaldslógini er ásett, at ”*En betalingsmodtager er forpligtet til at modtage betaling med kontanter i tidsrummet fra kl. 06.00 til kl. 22.00, hvis denne modtager betalingsinstrumenter*

*omfattet af denne lov, jf. dog stk. 2, 3 og 5.”* Tað er sostatt eitt krav um at taka ímóti kontantum, um tann vinnurekandi eisini tekur ímóti gjaldskorti, sbrt. § 81 í gjaldslógini.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, fyri at kunna um, at tey eru fevnd av § 81 í gjaldslógini, tí fyritøkan tekur ímóti gjaldskortum. Tá fyritøkan tekur ímóti gjaldskortum, hevur hon eisini skyldu til at taka ímóti kontantum peningi.

Fyritøkan greiddi frá, at tey í einum tíðarskeiði ikki høvdu tikið ímóti kontantum, vegna innbrot og stuldur. Talan var um politimál, men hetta var síðani komið í rættlag aftur. Fyritøkan boðaði frá, at tey tí nú fóru at taka ímóti kontantum peningi aftur.

## Tørvur á nýggjari vegleiðing um ómaksgjøld

Brúkaraumboðið hevur fingið nakrar fráboðanir frá borgarum, sum vóru ørkymlaðir um at ómaksgjøld ikki vóru upplýst, og spurdu eisini hvussu tað kundi bera til at upphæddin á kortgjaldinum var so ymisk? Brúkaraumboðið svaraði fyrispurningunum og setti seg í summum føri í samband við tey vinnurekandi um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Brúkaraumboðið metti eisini at tørvur var á vegleiðing um ómaksgjald og kortgjald. Lógargrundarlagið fyri vegleiðingina er sbrt. § 67, stk. 1, nr. 3 í gjaldslógini og § 13 í marknaðarføringslógini.

§ 13 í marknaðarføringlógini er ásett, at tá vinnurekandi upplýsa prís til brúkarar, skal altíð upplýsast um fullan prís, íroknað ómaksgjald og líknandi:

*”**§ 13.** Í sambandi við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld. Avgjøld ella útreiðslur, sum tann vinnurekandi ikki hevur skyldu til at krevja beinleiðis frá brúkaranum, eru ikki fevnd av 1. pkt., men skulu upplýsast fyri seg. Verða vørur bjóðaðar út elektroniskt til brúkaran við møguleika fyri at bíleggja, eru 1. og 2. pkt. eisini galdandi.”*

Gjaldslógin, sum fekk gildi í Føroyum í 2021, hevur eisini áseting um avgjøld. Sbrt. § 67, stk. 1, nr. 3, skulu vinnurekandi, har tað er møguligt, upplýsa um upphæddina á avgjaldinum. Er talan um fleiri avgjøld, t.d. eitt ómaksgjald og eitt kortgjald, ella fleiri ómaksgjøld, ið fara til ymiskar veitarar, skulu hesi nágreinast soleiðis, at brúkarin veit hvat hann skal gjalda til hvønn. Ásetingin kann lesast niðanfyri:

**§ 67**. stk. 1, nr. 3: “*En udbyder af betalingstjenester skal, senest samtidig med at der indgås aftale om at udføre en enkeltstående betalingstjeneste, meddele eller stille følgende oplysninger til rådighed for brugeren på en let tilgængelig måde*: *De gebyrer, som brugeren skal betale til udbyderen, herunder en udspecificering af gebyrerne.*

Brúkaraumboðið gjørdi av at hoyra vinnurekandi fyri at fáa teirra sjónarmið og viðmerkingar til vegleiðingina. Vegleiðingin varð løgd út á heimasíðuna 20. september 2024.

Eftir at vegleiðingin var løgd út á heimasíðuna hjá Brúkaraumboðnum, setti Brúkaraumboðið seg í samband við vinnurekandi, har tað ikki var upplýst rætt um hesi avgjøld. Brúkaraumboðið vísti á vegleiðingina og greiddi frá, hvussu tað skuldi upplýsast rætt.

## Mál um ómaksgjøld – avgreiðslugjald og kortgjald

Tveir brúkarar vendu sær til Brúkaraumboðið í sambandi við keyp av atgongumerkjum til konsertir. Teir vístu á, at ov høgt ómaksgjald kom á prísin fyri atgongumerki, og harafturat kom eitt kortgjald, ið ikki var upplýst um.

Brúkaraumboðið greiddi frá, at tað er ásett í § 67, stk. 1, nr. 3 í gjaldslógini, at um avgjøld verða løgd afturat samlaða prísinum, skulu hesi upplýsast. Kortgjald er at meta sum avgjald, ið verður kravt afturat, og eigur tí at vera upplýst.

Kortgjaldið fer vanliga til veitaran av kortinum, og ikki til tann vinnurekandi. Tí kann kortgjaldið vera ymiskt, alt eftir hvørjum kortið borgarin rindar við, og hvørja upphædd, ið keypt verður fyri. Tí ber ikki til hjá vinnurekandi at upplýsa frammanundan, hvat kortgjaldi verður. Brúkaraumboðið skal kortini vísa á, at vinnurekandi sum minstamark mugu upplýsa, at tað kemur eitt kortgjald afturat prísinum, soleiðis at brúkarin verður kunnaður um hetta.

Í hesum føri hevði heimasíðan kortini tann møguleika, at tað bar til at síggja kortgjaldið, tá kortnummarið var inntøppað. Á henda hátt, bar til hjá borgaranum at síggja samlaðu upphæddina, áðrenn keypið varð gjøgnumført. Brúkaraumboðið metti tí, at hetta var nóg væl upplýst fyri borgaranum.

Brúkaraumboðið umsitur og hevur eftirlit við marknaðarføringslógini og pørtum av gjaldslógini. Sambært hesum lógum, skulu øll avgjøld upplýsast greitt og rætt, áðrenn brúkarin skal gjalda. Brúkaraumboðið vísti á, at um brúkarin ikki er samdur við upphæddini á avgjaldinum, ber til at venda sær til Kappingareftirlitið við hesum.

Í einum øðrum føri fekk Brúkaraumboðið fráboðan frá borgara um eitt sera høgt kortgjald. Brúkarin hevði meldað seg til

eitt skeið, og hevði í tí sambandi keypt ígjøgnum eina heimasíðu. Upphæddin hon skuldi gjalda var kr. 8.308,00, men so kom kr. 228,47 afturat í kortgjaldi. Brúkaraumboðið vísti á, at støddin á kortgjaldinum er tengd at upphæddini keypt verður fyri og hvat slag av korti verður brúkt. Eitt nú er kortgjaldið á einum útlendskum gjaldskorti hægri í mun til onnur kort. Brúkaraumboðið mælti borgaranum til at seta seg í samband við tann vinnurekandi, fyri at vita um tað var rætt, at kortgjaldið í hesum føri var so høgt.

## Fyrispurningar frá borgarum um elektronisk gávukort

Brúkaraumboðið fekk nakrar fyrispurningar um elektronisk gávukort, og verða tveir teirra umrøddir her.

**Kann peningurin á gávukorti útgjaldast?**
Ein borgari vildi vita, um hann hevði rætt til, at fáa peningin á einum gávukorti útgoldnan. Upplýst varð, at einki stóð á sjálvum gávukortinum um hetta.

Brúkaraumboðið svaraði hesum borgara, at til ber at fáa pening á gávukortinum útgoldnan, um gávukortið uppfyllir hesar tríggjar treytir:

- Er elektroniskt
- Kann nýtast til at keypa vørur og tænastur fyri
- Er skrivað út móti gjaldið

### Gildistíð á 1 ár, og um peningurin kann útgjaldast, tá gávukortið er útgingið

Tann seinni fyrispurningurin snúði seg um, hvørt tað er í lagi, at ein handil ásetur, at eitt gávukort skal brúkast 1 ár eftir, at tað er keypt. Í hesum føri var 1 ár farið, og borgarin ynskti tí at vita, um til bar at fáa peningin útflýggjaðan, hóast at freistin var farin.

Brúkaraumboðið vísti á, at tað er loyvt at seta eina freist á 1 ár á eitt gávukort. Eingin føst regla er fyri, hvussu stutt freistin fyri eitt gávukort kann vera, men meginreglan er, at móttakarin skal hava høvi at brúka gávukortið í eina rúma tíð. Fatanin hjá Brúkaraumboðnum er, at ein freist styttri enn 1 ár, er ikki góður marknaðarføringssiður.

Um gávukortið uppfyllir treytirnar, ber til at fáa peningin út. T.v.s. at gávukortið skal vera elektroniskt, tað skal bera til at keypa ymsar vørur og tænastur fyri tað, og onkur skal hava goldið fyri tað.

Um hesar treytirnar eru uppfyltar, kann borgarin krevja at fáa peningin útgoldnan í upp til eitt ár eftir at gávukortið er útgingið.

Les meira um onnur gávukort undir spurningar umvegis telefon.

# Brúkaraumboðið gjørt vegleiðing um elektronisk gávukort

Tøkniliga menningin nógvu seinastu árini hevur grundleggjandi broytt, hvussu vit gjalda fyri vørur og tænastur. Elektroniskur peningur og elektroniskar tænastur eru nú vanligt gjaldsamboð og gjaldshættir. Gávukort eru dømi um eina sokallaða ikki-ókeypis elektroniska tænastu, um tey lúka ávísar treytir, sbrt. § 1, stk. 5 í gjaldslógini.

## Lógargrundarlagið

**§ 1.** *stk. 5. "§ 66, § 75, § 77, stk. 1, nr. 1 og 2, § 79, stk. 2, § 82, stk. 1 og 2, §§ 96, 99, 100, 104, 108, 117-119, 122, 123 og 125, finder anvendelse på ikkevederlagsfrie elektroniske tjenester, der kan benyttes til at erhverve varer eller tjenesteydelser, og betalingstransaktioner, hvor betalerens samtykke til at gennemføre transaktionen meddeles ved hjælp telekommunikationsudstyr og betalingen sker til den operatør, der driver kommunikationsnettet, og som kun agerer som mellemmand mellem brugeren af betalingstjenesten og leverandøren af varer og tjenesteydelser, uden at disse tjenester udgør en betalingstjeneste omfattet af bilag 1, uanset § 5, nr. 17."*

§ 1, stk. 5 er eisini allýsingin av teimum treytum, ið verða settar til ikki-ókeypis elektronisku tænastuna. Tænastan skal vera:

- Elektronisk
- Nýtast til at keypa vørur og tænastur fyri (benyttes til at erhverve varer og tjenesteydelser)
- Er skrivað út ímóti gjaldi (ikkevederlagsfri)

Sambært § 1, stk. 5 eru ávísar ásetingar í gjaldslógini galdandi fyri ikki-ókeypis elektroniskar tænastur. Ein teirra er § 96, stk. 2, sum ásetur, at eigarin av elektroniska peninginum ella virðinum, kann fáa hetta útgoldið í gildistíðini og upp til eitt ár eftir at gildistíðin er farin. Hetta merkir sostatt, at eigarin av gávukortinum, kann fáa peningin á gávukortinum útgoldnan í gildistíðini og upp til eitt ár eftir at gávukortið er útgingið.

Ásett er eisini í § 96, stk. 4, at vinnurekandi kunnu krevja ómaksgjald fyri at gjalda peningin út. Avgerandi er kortini, at tað er upplýst um ómaksgjaldið frammanundan.

## Tørvur á greiðari vegleiðing

Gjaldslógin varð sett í gildi í Føroyum 1. juli 2021. § 96, stk. 2 í gjaldslógini gevur brúkaranum rætt til at fáa elektroniska virðið útgoldið. Hetta er ein nýggjur rættur, sum brúkarin ikki hevði krav uppá áðrenn lógin var sett í gildi. Brúkaraumboðið fær javnan spurningar hesum viðvíkjandi, frá bæði vinnurekandi og borgarum. Brúkaraumboðið metti tí, at neyðugt var við eini vegleiðing, soleiðis at tað gerst greitt fyri bæði brúkarum og vinnurekandi, hvat er galdandi viðvíkjandi elektroniskum gávukortum.

Vegleiðingin kann lesast á næstu síðunum í hesi ársfrágreiðing. ★



# Vegleiðingar og kunning



Brúkaraumboðið

# Elektronisk gávukort hevur tú rætt til at fáa útgoldið

**Tú kanst fáa virðið á gávukortinum útgoldið, um gávukortið uppfyllir hesar treytir:**

- **Er elektroniskt**

Hetta eru t.d. kort við flís, **magnetstrípu**, strikukotu, QR-kotu ella aðrari kotu til elektroniska avlesing ella innsláttur. Kort, **sum ikki kunnu lesast** av elektroniskt, kunnu ikki útgjaldast.




- **Kann nýtast til at keypa vørur og tænastur**

**Avgerandi er,** at kortið kann nýtast til eitt úrval av vørum og tænastum. Kort, ið eru útskrivað til eina einstaka, ávísa veiting, t.d. eitt atgongumerki til ein ávísan fótbóltsdyst, ein ávísan dag og eina ávísa klokkutíð, kunnu ikki útgjaldast.

- **Er skrivað út móti gjaldi**

Tað skal verða goldið fyri gávukortið, antin beinleiðis ella óbeinleiðis. **Tilgóðarseðil ella gávukort, ið tú fært**, tá tú skiftir eina vøru um, hevur tú eisini rætt til at fáa útgoldið**, um tað er elektroniskt** og kann nýtast til at keypa vørur og tænastur. Gávukort, sum verða givin ókeypis, t.d. tá ein handil letur gávukort til vælgerðararbeiði ella í sambandi við stuðulsarbeiði, **kunnu ikki útgjaldast**.

## Útgjalding av virðinum

Tú hevur møguleika at fáa peningin útgoldnan í gildistíðini og **upp til eitt ár eftir**, at gildistíðin er liðin. Hetta er galdandi**, sjálvt um fyritøkan** t.d. hevur skrivað á kortið ella í treytirnar, at upphæddin ikki kann verða goldin út í reiðum peningi. Um **eingin gildistíð er avtalað**, hevur tú altíð rætt til at fáa virðið útgoldið.

## Ómaksgjald fyri útgjalding av virðinum

Tú kanst **verða kravd/ur eftir ómaksgjaldi**, um tú biður um at fáa útgjalding**, áðrenn gildistíðin er runnin.** Treytin er tó, at ómaksgjaldið skal vera upplýst frammanundan.

Tá ið gildistíðin er liðin og upp til eitt ár eftir tað, **kanst tú ikki verða kravd/ur eftir ómaksgjaldi fyri útgjalding**. Ómaksgjaldið skal samsvara við tær veruligu útreiðslurnar, ið standast av at fáa virðið útgoldið. Eru útreiðslurnar órímiliga høgar, má ómaksgjaldið tó ikki vera samsvarandi so høgt. Ómaksgjaldið kann ikki verða ójavnt, og tí ber ikki til at áseta eitt gjald, sum er ein prosentpartur av virðinum, sum skal gjaldast út.

| Gildistíðin á gávukortinum | Upp til 1 ár aftaná | Longur enn 1 ár aftaná |
|---|---|---|
| Vinnurekandi kunnu krevja ómaksgjald | Vinnurekandi kunnu ikki krevja ómaksgjald | Vinnurekandi kunnu krevja ómaksgjald, men hava ikki longur skyldu at útgjalda peningin |

---

## Hvør skal gjalda gávukortið út?

Tann, sum hevur **útskrivað gávukortið**, hevur **skyldu til at gjalda gávukortið út**.

Tað kann t.d. vera ein handil/handilsketa ella talan kann vera um eitt fyrisitingarfelag, ið eigur eina sølumiðstøð, har gávukortið kann verða nýtt í teimum einstøku sølubúðunum í miðstøðini.

Gávukortið skal gjaldast út til ásetta virðið.

---

## Aðrar líknandi elektroniskar tænastur

Reglurnar fyri elektronisk gávukort eru eisini galdandi fyri aðrar elektroniskar tænastur. Tað kann t.d. vera elektroniskir tilgóðarseðlar, elektronisk klippikort ella líknandi, tó treytað av, at hesi eru útflýggjað móti gjaldi.

---

## Lógargrundarlag

§ 96 í gjaldslógini:

"**§ 96.** Udstedere af elektroniske penge må ikke udstede elektroniske penge til overkurs.

*Stk. 2.* Indehavere af elektroniske penge kan inden udløbet af de elektroniske penge og i op til 1 år efter udløbet anmode om, at restværdien indløses til pålydende værdi.

*Stk. 3.* Anmoder indehavere af elektroniske penge om indløsning efter udløbet af de elektroniske penge, jf. stk. 2, og udøver udstederen af elektroniske penge aktiviteter som nævnt i § 18, stk. 1, nr. 2-4, og er det ikke på forhånd kendt, hvilken andel af midlerne der skal anvendes til elektroniske penge, skal udstederen af elektroniske penge indløse alle de midler, som indehaveren af elektroniske penge har anmodet om.

*Stk. 4.* Der kan kun opkræves gebyr i forbindelse med indløsning, hvis dette fremgår af aftalen, og kun, hvis

1) der kræves indløsning inden de elektroniske penges udløb,
2) aftalen mellem udstederen og indehaveren indeholder en udløbsdato og indehaveren af de elektroniske penge opsiger aftalen inden denne dato eller
3) der kræves indløsning mere end 1 år efter udløbet af aftalen mellem udstederen og indehaveren.

*Stk. 5.* Et eventuelt gebyr som nævnt i stk. 4 skal svare til de faktiske omkostninger for udstederen af elektroniske penge, medmindre omkostningerne er uforholdsmæssigt høje.

*Stk. 6.* Indløsningsbetingelser og gebyrer skal klart fremgå af rammeaftalen mellem udstederen og indehaveren. Indehaveren af de elektroniske penge skal oplyses om disse betingelser, før vedkommende bliver bundet af en aftale."

Sambært § 1, stk. 5 í gjaldslógini, er § 96 eisini galdandi fyri elektronisk gávukort.

"*Stk. 5.* § 66, § 75, § 77, stk. 1, nr. 1 og 2, § 79, stk. 2, § 82, stk. 1 og 2, §§ 96, 99, 100, 104, 108, 117-119, 122, 123 og 125, finder anvendelse på ikkevederlagsfrie elektroniske tjenester, der kan benyttes til at erhverve varer eller tjenesteydelser […]"

## Ómaksgjøld – avgreiðslugjald og kortgjald

- **Hvat er eitt ómaksgjald?**

  Eitt ómaksgjald er **ein upphædd**, sum verður goldin fyri eina serliga tænastu, funksjón ella veiting, **sum er knýtt at keypinum** av eini vøru ella tænastu, og sum ikki verður rindað fyri eina sjálvstøðuga veiting, sambært § 13, stk. 5 í marknaðarføringslógini.

  Ómaksgjøld verða m.a. kravd, tá atgongumerki til tiltøk verða seld á netinum.

- **Hvussu stórt kann eitt ómaksgjald vera?**

  Eitt ómaksgjald **kann ikki vera órímiliga** høgt í mun til tænastuna, sum ómaksgjaldið fevnir um. Støddin á eykakostnaðinum skal t.d. **svara til** tær rímiligu útreiðslurnar, sum eru **tengdar at** gjaldinum, tikið verður ímóti.

- **Marknaðarføring av prísi**

  Prísurin, ið verður upplýstur, í marknaðarføring – t.d. á heimasíðum og sosialum miðlum, skal vera rættur, greiður og fullfíggjaður. **Tað skal sostatt týðiliga** upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis **ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld**.
  Hetta er ásett í § 13 í lóg um marknaðarføring. Endamálið við ásetingini er, at brúkarar, áðrenn teir keypa eina vøru ella tænastu, skjótt og ómakaleyst kunnu síggja, hvør samlaði prísurin er.

- **Hvat skal vera upplýst saman við prísinum?**

  **Øll avgjøld** skulu týðiliga upplýsast saman við prísinum. T.v.s. at har **ið prísurin verður nevndur fyrstu ferð**, skulu avgjøldini **eisini standa.**
  Um ein fyriskipari lýsir við einum tiltaki, men sølan fer fram umvegis heimasíðu hjá øðrum veitara, kann tað vera torført at vita, hvussu høgt avgreiðslugjaldið verður. Í slíkum førum skal sum minstamark upplýsast, at avgreiðslugjald og kortgjald verða lagt afturat prísinum.

Tað hevur **minni at siga**, um tað eitur avgjald, avgreiðslugjald, ómaksgjald, provisión ella hvat útreiðslan verður nevnd. Um tað er eitt gjald, sum knýtir seg at keypinum av vøruni ella tænastuni, og sum brúkarin ikki kann sleppa undan at gjalda, **skal tað upplýsast saman við prísinum.**

---

- **Kortgjald**

Kortgjald er ein upphædd, sum **kann verða kravd frá brúkaranum**, tá hann keypir eina vøru ella tænastu á netinum.
Kortgjaldið verður vanliga kravt av kortveitara, og er tí ikki partur av tí samlaða prísinum hjá tí vinnurekandi.
Støddin á kortgjaldinum er tengd at upphæddini keypt verður fyri og hvat slag av korti verður brúkt.
Tann vinnurekandi skal tó upplýsa um, at eitt kortgjald verður lagt afturat upphæddini. Um tað er møguligt, skal upphæddin á kortgjaldinum eisini upplýsast, sbrt. § 67, stk 1, nr. 3 í gjaldslógini.

---

**Dømi upp á, hvussu prísurin skal upplýsast:**

<u>Dømi 1: Prísur + avgreiðslugjald + upplýsing um kortgjald</u>




<u>Dømi 2: Samlaður prísur íroknað avgreiðslugjald + upplýsing um kortgjald</u>



Verða fleiri ómaksgjøld kravd, skulu hesi útgreinast soleiðis, at tað er gjørligt hjá brúkaranum at **eyðmerkja einstaka ómaksgjaldið**. Kortini kunnu ómaksgjøldini verða kravd sum ein samlað upphædd, sbrt. § 67, stk. 1, nr. 3 í gjaldslógini.

Avgjøld ella útreiðslur, sum verða kravdar frá brúkaranum í sambandi við, at hesin keypir eina vøru, men sum tann vinnurekandi ikki hevur skyldu at krevja beinleiðis frá brúkaranum, **skulu ikki roknast upp í tann samlaða prísin**, men skulu upplýsast fyri seg.

Við hesum verður tryggjað, at brúkarin fær eitt samlað yvirlit yvir tær **fíggjarligu avleiðingarnar** av keypinum, samstundis sum brúkarin fær at vita, hvussu nógv hann skal gjalda tí vinnurekandi.

---

- **Verður ómaksgjald endurrindað?**

Ómaksgjald verður vanliga **ikki endurrindað.** Um til ber at angra keypið og fáa peningin afturgoldnan fyri vøruna, er tað **góður marknaðarføringssiður** at upplýsa, um **ómaksgjaldið verður endurrindað ella ikki.**

---

- **Ómaksgjald í sambandi við útgjalding av elektroniskum peningi**

Ómaksgjald **kann vera tikið** í sambandi við **útgjalding av elektroniskum peningi**, - t.d. elektronisk gávukort - um persónurin biður um at fáa útgjalding, áðrenn gildistíðin er runnin. Ómaksgjaldið skal tó vera avrátt frammanundan.
Ómaksgjaldið skal **samsvara við tær veruligu útreiðslurnar**, ið standast av at fáa virðið útgoldið.
Eru útreiðslurnar órímiliga høgar, má ómaksgjaldið tó ikki vera samsvarandi so høgt.
Ómaksgjaldið fyri elektroniskan pening kann ikki verða ójavnt, og tí ber ikki til at áseta eitt gjald, sum er ein prosentpartur av virðinum, sum skal gjaldast út.

## Greiðari treytir fyri bilaútleigan

Brúkaraumboðið hevur í 2024 sent soljóðandi skriv til fyritøkur, sum leiga bilar út:

Brúkaraumboðið hevur seinastu tíðina fingið fleiri fyrispurningar og klagur viðvíkjandi bilaútleigan. Klagurnar eru serliga frá útlendskum ferðafólkum, sum eru ørkymlaði um kostnaðin av at koyra í undirsjóvartunlunum. Felagið Tunnil hevur eisini sett seg í samband við Brúkaraumboðið, tí ferðafólk venda sær eisini til teirra við somu fyrispurningum.

Í høvuðsheitum hava málini snúð seg um ógreiðar avtalu- og keypstreytir ella um marknaðarføring av vørum og tænastum í sambandi við bilaútleigan.

Sum dømi kann nevnast, at ein fyritøka bjóðaði ókeypis koyring í undirsjóvartunlunum. Men tá ferðin var av og rokningin kom, vísti tað seg, at talan var bert um ókeypis koyring í Norðoya- og Vágatunlinum. Hetta var ikki upplýst fyri kundanum, og talan var tískil um villleiðandi marknaðarføring.

Í øðrum førum hevur talan verið um ógreiðar orðingar ella avtalutreytir hjá bilaútleigarum, og tí hava viðskiftafólk ivast í, um prísurin fyri at koyra í tunlunum var fyri annan vegin ella báðar vegir.

Dømi hevur eisini verið um ógreiðar treytir í sambandi við endurgjald fyri avlýsing av leigubili. Harafturat eru dømi um, at bilaútleigarar hava lagt mvg á tunnilsgjøldini, hóast hesi gjøld eru undantikin mvg. Gjørt verður vart við, at tað er ikki heimild at leggja mvg á tunnilsgjøld.

Brúkaraumboðið hevur verið í samband við bilaútleigararnar, ið klaga hevur verið um. Í øllum føri er marknaðarføringin og avtalutreytirnar rættaðar.

Brúkaraumboðið heitir á allar bilaútleigarar um, at upplýsa greitt hvørjar treytir eru galdandi fyri útleigan, herundir:

- Hvat kostar tað fyri kundan at koyra í gjøgnum teir ymisku undirsjóvartunlarnar.
- Er talan um gjald hvønn vegin ella fevnir gjaldið um koyring báðar vegir.
- Um koyring í nøkrum undirsjóvartunlum er ókeypis fyri kundan, skal tað greitt tilskilast hvørjar tunlar talan er um.
- Hvørjar treytir eru fyri avlýsing. Er tað møguligt at fáa ein part ella allan peningin afturgoldnan – og verður møguligt ómaksgjald eisini afturgoldið?
- Eru serligar treytir ella avmarkingar galdandi, eiga hesar greitt at vera tilskilaðar.

### Lógargrundarlagið

Brúkaraumboðið umsitur og hevur eftirlit við, at marknaðarføringslógin verður hildin. Brúkaraumboðið tekur avgerð um eitt marknaðarátak er í stríð við marknaðarføringslógina.

# Black Friday – gott at vita áðrenn farið verður á stóra útsøludagin

Í samband við stóra, árliga, útsøludagin "Black Friday", skrivaði Brúkaraumboðið soleiðis á heimasíðuna:

Nú stundar til Black Friday við nógvum góðum tilboðum, og har til ber at gera kvettið – um átøkini halda tað tey lova.

Novembur er stórur útsølumánaður. Lýst verður við tilboðum uppá alt frá telefonum til klæðir, búnýti, skógvar o.s.fr. Lat tó ikki lýsingasnildirnar lumpa teg.

Tá marknaðarført verður við "útsølu", "tilboð", "Black Friday prísur" ella líknandi, er týdningarmikið, at prísurin veruliga er lækkaður, og at gamli fasti prísurin (undanprísurin) er upplýstur. Undanprísir skulu vera sannir. Vanliga skal lægsti undanprísur framman undan søluni vera settur á, og vøran skal veruliga verða seld fyri tann prísin.

**Undanprísurin skal hava verið galdandi í ávíkavist 6 og 4 vikur undan tilboðnum**
Tað er av týdningi, at tann vinnurekandi upplýsir undanprísin umframt núverandi prísin, so brúkarin alt fyri eitt sær, hvussu nógv hann kann spara. Meginreglan er, at undanprísurin skal hava verið galdandi í minsta lagi 6 vikur, áðrenn tilboðið kemur í gildi. Fyri gerandis – og árstíðarbundnar vørur, t.d. matvøru ella jólaprýði, er kravið 4 vikur. Upplýsast skal tann lægsti prísurin, ið vøran hevur kostað tær síðstu 6 vikurnar (4 vikurnar fyri gerandis – og árstíðarbundnar vørur).

**Avmarkað nøgd**

Um talan bert er um fá eintøk til sølu ella royndirnar vísa, at tilboðið er so mikið gott, at væntast kann, at útselt verður skjótt, skal fyrivarni takast um avmarkaða nøgd.

Um nøgdin er sera avmarkað, skal upplýsast, hvussu nógv eintøk eru sett til sølu. Vanliga eru undir 10 stk. mett sum sera avmarkað.

Brúkaraumboðið heitir á øll vinnurekandi um at seta seg væl inn í reglurnar, soleiðis at marknaðarføringin ikki verður villleiðandi og ólóglig.

**Góð ráð til brúkaran:**

- Kanna um vøran veruliga er niðursett – hvussu nógv er at spara?
- Er vøran møguliga bíligari í einum øðrum handli/nethandli?
- Um tú keypir bil, møblar ella líknandi og í tí sambandi tekur lán – kanna samlaðar kredittútreiðslur.

**Góð ráð til vinnurekandi:**

- Minst til at upplýsa undanprísin á vøruni.
- Undanprísurin skal vera brúktur í rúma tíð áðrenn tilboðið byrjar (Sí tekstin omanfyri).
- Væntast at sølan av eini vøru verður stór, tí tilboðið er so mikið gott, minst so til at upplýsa um tað er avmarkað nøgd.
- Eru tíggju ella minni eintøk eftir av eini vøru, minst so til, at upplýsa tali á eintøkum, ið eru sett til sølu.
- Tað skal vera heilt greitt fyri brúkaran, um vøran verður seld fyri niðursettan prís ella um tað bert verður lýst fyri vøruni.

# Norðurlendsku brúkaraumboðini økja samstarvið fyri at styrkja brúkaraverndina

Norðurlendsku brúkaraumboðini hittust í døgunum 26. til 28. august 2024 til árligan fund, sum hesaferð varð hildin í Svalbard. Tað vóru brúkaraumboðini í Danmark, Føroyum, Finnlandi, Grønlandi, Íslandi, Svøríki og Noregi sum møttust fyri at skifta orð um felags avbjóðingar, innan økið hjá brúkaraumboðnum.

Norðurlendsku brúkaraumboðini eru samd um týdningin av einum øktum altjóða samstarvi. Vit síggja nýggjar handilspallar og rák spjaða seg skjótt á tí evropeiska marknaðinum. Fyri at kunna reagera upp á hesar avbjóðingar, so sum talgilding, stórar altjóða fyritøkur, keyp og sølu yvir netið og marknaðarføring tvørtur um landamørk, er tað av týdningi, at hvør myndugleiki nýtir sínar resursur á skilabestan hátt.

Av tí at norðurlendsku brúkaraumboðini hava líknandi reglur á flestu økjum, ber til at samstarva um løgfrøðiligar tulkingar og handhevjan av málum.

Økta samstarvið millum norðurlendsku brúkaraumboðini leiðir eisini til vaksandi rættartrygd og gjøgnumskygni fyri vinnurekandi í norðurlondum, tí hesi sum oftast kunnu nýta sama handils- og marknaðarføringssið, uttan mun til hvørjum norðurlendskum landi tey virka í.




*Býurin Longyear, har fundurin varð hildin*



*Rannvá Sólheim, Brúkaraumboð*



*Her sita norðurlendsku brúkaraumboðini á fundi í Longyear, Svalbard*

Við at savna saman styrkirnar á einum norðurlendskum støði, kunnu vit saman loysa trupulleikar og umrøða nýggj rák, ið ferðast tvørtur um landamørkini. Samstarvið millum brúkaraumboðini gevur okkum møguleika at savna saman vitan, deila praksis og kjakast um, hvussu vit skilja tær felags reglurnar vit hava.

Eftir okkara sannføring, er eitt norðurlendskt samstarv ikki bert gott at hava – men neyðugt at hava!

## Jobmatch 2024

Mánadagin 30. desember 2024 var árliga Jobmatch í Norðurlandahúsinum.

Brúkaraumboðið luttók saman við øðrum umboðum frá Vinnustovninum. Hetta riggaði avbera væl, og høvdu vit nógv vitjandi.

*Her eru nakrar myndir frá degnum:*








Brúkaraumboðið

Brúkaraumboðið, Skálatrøð 20, Postrúm 73, FO-110 Tórshavn, Tel: +298 35 80 00, bruk@bruk.fo, www.bruk.fo